| | |
|---|---|
| **Býráðsfundur**<br>24. apríl 2019 | Blað nr.: 337<br>Formansins merki: |

# GERÐABÓK

**Dato:** 24. apríl 2019 **Kl**. 18:00
**Stað**: Býráðssalurin
**Málsnr:** 80/19-100/19

**FUNDARLEIÐARI:**
Annika Jacobina Olsen

---

**VIÐ LUTTØKU AV:**
Helena á Dam Neystabø
Tróndur Sigurðsson
Bogi Andreasen
Annfinn Brekkstein
Jákup Dam
Marin Katrina Ragnarsdóttir Frýdal
Bjørghild Djurhuus
Gunvør Balle
Turið Horn
Bergun Kass
Bjørg Dam

**LUTTÓKU EISINI:**
Marius Muller
Barbara Vang
Eyðfríð Jacobsen
Eyðna Justinussen
Lars Larsen Black
David Andrésen
Niels Juel Arge

**LUTTÓKU IKKI:**
Halla Samuelsen

**SKRIVARI:**
Jóan Petur Hentze

**PROTOKOLLFØRARI:**
Magnus Dam

| | |
|---|---|
| **Býráðsfundur**<br>24. apríl 2019 | Blað nr.: 338<br>Formansins merki: |

## Innihaldsyvirlit

**Síða**

### Til viðgerðar


| | | | |
|---|---|---|---|
| 80/19 | 19/00098-1 | Mál beind í nevndir 2019 | 340 |
| 81/19 | 19/00967-4 | Søla matr.nr. 135cp, Hoyvík. | 342 |
| 82/19 | 19/00968-3 | Søla av matr.nr. 138co, Hoyvík. | 344 |
| 83/19 | 19/01501-2 | Góðkenning eigaraskifti matr.nr. 138da, Hoyvík. | 346 |
| 84/19 | 19/01512-3 | Matr.nr. 139s, Hoyvík. Verandi eigari flytir ognina yvir í nýtt Sp/f sum ætlandi kemur at byggja á grundstykkinum. | 348 |
| 85/19 | 19/01531-1 | Undirskriftsreglur í sambandi við skjøl, ið binda kommununa | 350 |
| 86/19 | 19/00897-2 | Í sambandi við endurnýggjan av leigusáttmálanum millum TK og Ebenezer um Sloans Hús verður hesin broyttur til Sloans Savn | 352 |
| 87/19 | 19/01563-1 | Nevndarlimur til Visit Tórshavn | 354 |
| 88/19 | 19/00945-1 | Eykajáttan til nýggj dagstovnapláss í 2019 | 356 |
| 89/19 | 14/04756-36 | Tórshavnar Golfklubbi: Umsókn um stuðul til byggjan av golfvølli og felagshúsi gl. j. nr. 10/27.1991 (1999-1642) | 359 |
| 90/19 | 17/03195-1 | Nýggjur umlættingar- og rehabiliteringsdepil | 369 |
| 91/19 | 19/01676-1 | Skipan av fyribils dagstovni í Hoydølum | 380 |
| 92/19 | 17/03498-2 | Gøtunavn til innkoyringarveg frá Glyvursvegi til “Undir Kongavarða” og “Við Klingurstjørn” | 382 |
| 93/19 | 16/01715-2 | Avtala við Ítróttasamband Føroya um ÍSF-húsið vm. | 385 |
| 94/19 | 18/03266-1 | Umsókn um grundøkir til vardar bústaðir – Grundøki til bú- og umlættingarheim til børn og ung við autismu | 392 |
| 95/19 | 19/00172-1 | Heimsmálini hjá ST - Global Agenda 2030 | 395 |
| 96/19 | 19/00769-1 | Nýggj serstøk byggisamtykt fyri heim til børn og ung við autismu við Kvíggjartún, matr. nr. 56a, Argir | 398 |
| 97/19 | 18/03069-1 | Nýggj serstøk byggisamtykt á Argjaboða, matr. nr. 43g, Argir | 401 |
| 98/19 | 19/01527-1 | Framflytingar fyri árið 2018 | 404 |
| 99/19 | 19/01526-1 | Ársroknskapur fyri Tórshavnar kommunu 2018 | 407 |
| 100/19 | 19/00096-1 | Góðkenning av mánaðarroknskapinum 2019 | 409 |

## ***80/19 Mál beind í nevndir 2019***

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Býráðsfundur | 31.01.2019 | 4/19 | 19/00098-1 |
| 2 Býráðsfundur | 28.02.2019 | 31/19 | 19/00098-1 |
| 3 Býráðsfundur | 28.03.2019 | 56/19 | 19/00098-1 |
| 4 Býráðsfundur | 24.04.2019 | 80/19 | 19/00098-1 |

**Upprunin til málið:**

**Lýsing av málinum – samandráttur**

**Lógir, ásetingar o.a.**

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Møgulig frávik/lættar frá ásetingum**

**Umhvørvisárin**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl**

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** (set x)

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** Ja ☐ Nei ☐

**Tilmæli:**

**Býráðsfundur 31. januar 2019:** Einmælt samtykt.

**Býráðsfundur 28. februar 2019:** Einmælt samtykt.

**Býráðsfundur 28. mars 2019:** Einmælt samtykt.

**Býráðsfundur 24. apríl 2019:** Einmælt samtykt**.**

# 81/19 Søla matr.nr. 135cp, Hoyvík.

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 10.04.2019 | 114/19 | 19/00967-4 |
| 2 Býráðsfundur | 24.04.2019 | 81/19 | 19/00967-4 |

**Upprunin til málið:**
Kommunan hevur keypt grundstykkið aftur, vísandi til at grundstykkið er óbygt.

**Lýsing av málinum – samandráttur**
Vídd 499m2. Grundstykkið er hella og verður neyðugt at spreingja ovasta lag av helluni tá økið verður planerað.

Grundstykkið hevur ligið á sølulista hjá ognarmeklara. Hægsta boð var kr. 900.000,00 og kom onki mótboð eftir hetta.

Ognarmeklarin hevur tikið grundstykkið av sølulista higartil at býráðið hevur tikið avgerð í málinum.

**Servituttir.**
Vísandi til at grundstykkið verður selt í fríðari sølu til hægsta boð, verður mett neyðugt at gera nakrar broytingar í servituttunum, ímun til at stykkið í 1997, hevur verið tillutað til kostprís.

Stykkið verður selt í tí standi sum tað liggur, og sum keyparin hevur sýnað og góðtikið tað, og verður tað av keyparanum at nýta í samsvari við tær ásetingar, sum í byggisamtyktini eru ásettar til at galda fyri umráðispartin.

Í uppruna skeytinum sum er tinglýst í 1997, er tinglýstur servituttur:

<u>Grein 5.</u>
Innan 2 ár frá tí, at endaligt skeytið er tinglýst, skulu sethús verða bygd á stykkinum, annars fellur stykkið aftur til seljarans, móti at keyparin fær keypspeningin og tað, hann hevur goldið fyri byggibúning afturgoldið uttan rentur. Fellur stykkið aftur av hesi orsøk, og keyparin hevur byrjað bygging, kann hann fáa prógvaðar útreiðslur endurgoldnar í tann mun, tað gjørda arbeiðið kemur seljaranum ella øðrum keypara av sama stykki til góðar.

Í Nýggja skeytinum verður henda orðing broytt til.

Byggingin skal vera liðug og byggiváttan útskrivað í seinasta lagi 2 ár frá tí, at skeytið er tinglýst. Annars tilskilar kommunan sær rætt til at krevja stykkið aftur fyri kr. 900.000,00 Fellur stykkið aftur av hesi orsøk, og keyparin hevur byrjað bygging, kann hann fáa prógvaðar útreiðslur endurgoldnar í tann mun, tað gjørda arbeiðið kemur seljaranum ella øðrum keypara av sama stykki til góðar.

Allar útreiðslur í samband við møguliga afturskeyting falla til keypara. Tórshavnar kommuna verður hildin skaðaleys fyri eini og hvørjari útreiðslu í hesum sambandi.

Átalurætt hevur Tórshavnar kommuna.

Grein 6.
Keyparin hevur ikki loyvi til at selja stykkið víðari, fyrr enn sethús eru bygd á stykkinum.

Henda áseting fellur burtur í nýggja skeytinum.

Annars verða allir tinglýstir servituttir óbroytt galdandi.

**Lógir, ásetingar o.a.** Kommunustýrislógin. Tinglýstir servituttir.

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Møgulig frávik/lættar frá ásetingum.**

**Umhvørvisárin.** Ongi.

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl.** Kortskjal.

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum (set x)**

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | x | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** **Ja** ☒ **Nei** ☐

**Tilmæli:** Kommunustjórin og leiðarin á Stjórnarskrivstovuni mæla til at selja grundstykkið fyri innkomið boð. Servituttir verða broyttir sí málsviðgerð.

**Fíggjarnevndin 10. apríl 2019:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 24. apríl 2019:** Einmælt samtykt.

## 82/19 Søla av matr.nr. 138co, Hoyvík.

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 10.04.2019 | 97/19 | 19/00968-3 |
| 2 Býráðsfundur | 24.04.2019 | 82/19 | 19/00968-3 |

**Upprunin til málið:**

Kommunan hevur keypt grundstykkið aftur, vísandi til at grundstykki lá óbygt.

**Lýsing av málinum – samandráttur.**

Talan er um grundstykki í útstykkingini við Myllutjørn. Grundstykkið hevur ligið á sølulista hjá ognarmeklara. Hægsta boð var kr. 800.000,00 og kom onki mótboð eftir hetta.

Ognarmeklarin hevur tikið grundstykkið av sølulista higartil at býráðið hevur tikið avgerð í málinum.

**Lógir, ásetingar o.a.** Kommunustýrislógin.

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Møgulig frávik/lættar frá ásetingum.** Ongir.

**Umhvørvisárin**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl.**

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** (set x)

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| Umsitingaravleiðingar | | | | |
| Umhvørvisavleiðingar | | | | |
| Sosialar avleiðingar | | | | |
| Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar | x | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar: Ja ☒ Nei ☐**

**Tilmæli:**
Kommunustjórin og leiðarin á stjórnarskrivstovuni mæla til at selja ognina fyri kr. 800.000,-

**Fíggjarnevndin 10. apríl 2019:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Býráðsfundur 24. apríl 2019:** Einmælt samtykt.

# 83/19 Góðkenning eigaraskifti matr.nr. 138da, Hoyvík.

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 10.04.2019 | 95/19 | 19/01501-2 |
| 2 Býráðsfundur | 24.04.2019 | 83/19 | 19/01501-2 |

**Upprunin til málið:** Umsókn frá Advokati.

**Lýsing av málinum – samandráttur.**
Viðvíkjandi matr.nr. 138da, Hoyvík, Karlamagnussarbreyt.
Vídd á grundstykki 877m2, harav 430m2 er partur av felagsøki og 447m2 er byggifelt.

Byggiloyvi til íbúðarbygning í 3 hæddum fyriliggur í máli 18/02111 og verður í umsóknini upplýst at íbúðarbygging er byrjað.

Verandi eigari selur grundstykkið til Sp/f 08.01.2019, skrás 6944. Upplýst verður at verandi eigari eigur smápartafelagið saman við øðrum, og er eisini stjóri í felagnum.

Sambært grein 3 í upprunaskeytinum, sum er tinglýst 11.04.2017, bindur eigarin seg til at byrja sína bygging innan 2 ár frá tí, at skeytið er tinglýst, og kann eigarin ikki selja stykkið víðari uttan góðkenning frá kommununi, fyrr enn bygningur sum kommunan kann góðkenna, er bygdur á byggifeltið á Karlamagnussarbreyt og í minsta lagi 6 metrar inn.

Víðarisøluskeytið verður ætlandi skrivað við somu upphædd sum uppruna skeytið kr. 1.025.826,67 og verða servittuttirnir teir somu, herundir eisini servituttur um byggifreist.

**Lógir, ásetingar o.a.** Kommunustýrislógin.

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Møgulig frávik/lættar frá ásetingum.** Frávik ímun til tinglýstan servitutt.

**Umhvørvisárin.** Ongi.

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl.** Kortskjal.

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** (set x)

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** **Ja** ☐ **Nei** ☒

**Tilmæli:** Kommunustjórin og leiðarin á stjórnarskrivstovuni mæla til at góðkenna at ognin verður seld.

**Fíggjarnevndin 10. apríl 2019:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 24. apríl 2019:** Einmælt samtykt.

# 84/19 Matr.nr. 139s, Hoyvík. Verandi eigari flytir ognina yvir í nýtt Sp/f sum ætlandi kemur at byggja á grundstykkinum.

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 10.04.2019 | 98/19 | 19/01512-3 |
| 2 Býráðsfundur | 24.04.2019 | 84/19 | 19/01512-3 |

**Upprunin til málið:** Umsókn frá eigara.

**Lýsing av málinum – samandráttur.**
Matr.nr. 139s, Hoyvík. Vinnustykki á Skarðshjalla. Vídd uml. 1.064m2. Grundstykkið liggur óbygt. Søluskeytið var tinglýst 16.07.2018. Søluprísur kr. 1.383.200,00

Verandi eigari søkir um at fáa flutt grundstykkið yvir í nýtt Sp/f

Ætlanin er at grundstykkið verður í øðrum felagið, sum síðani kemur at byggja og reka bygning á grundstykkinum. Rakstrarfelagið leigar síðani bygning/ ella part av bygningi við uttanum øki frá hesum felag.

Sambært grein 3. stykki d. og. e, hevur eigarin byggiskyldu, og skal bygging verða liðug 4 ár eftir at klárt er at byggja á stykkinum. Kommunan kann krevja sær ognarrættin til stykkið um keypari ikki heldur nevndu ásetingar.

Víðarisøluskeytið verður við somu serivuttum sum uppruna skeytið og verður stykkið selt fyri kr. 1.383.200,00 sum er samsvarandi upprunaprísinum.

**Lógir, ásetingar o.a.** Kommunustýrislógin.

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Møgulig frávik/lættar frá ásetingum.** Frávik ímun til tinglýstan servitutt.

**Umhvørvisárin.** Ongi.

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**Ongar.

**Skjøl.** Kortskjal, umsókn.

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** (set x)

| | Fyri | Fyri ávís | Fyri ávísar | Fyri |
|---|---|---|---|---|

| | Tórshavnar kommunu | økir í kommununi | samfelagsbólkar ella felagsskapir | vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar: Ja ☐ Nei ☒**

**Tilmæli**: Kommunustjórin og leiðarin á stjórnarskrivstovuni, mælir til at góðkenna at ognin matr. nr. 139s, Hoyvík verður seld til nýtt sp/f. sí málslýsing.

**Fíggjarnevndin 10. apríl 2019:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Býráðsfundur 24. apríl 2019:** Einmælt samtykt.

# 85/19 Undirskriftsreglur í sambandi við skjøl, ið binda kommununa

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 10.04.2019 | 100/19 | 19/01531-1 |
| 2 Býráðsfundur | 24.04.2019 | 85/19 | 19/01531-1 |

**Upprunin til málið:**

**Lýsing av málinum – samandráttur**
Sambært § 44, 2, í lóg nr. 87 frá 17. mai 2000 um kommunustýrið - kommunustýrislógin - skulu skjøl í sambandi við keyp og sølu av fastari ogn o.t. verða undirskrivað av borgarstjóranum og einum persóni, sum kommunustýrið hevur heimilað til tess.

Harumframt er ásett í § 6, 1. petti í Kommunustýrisskipanini fyri Tórshavnar kommunu, at øll skjøl, ið binda kommununa, skulu undirskrivast av borgarstjóranum og einum persóni, sum býráðið hevur heimilað til tess.

Býráðið samtykti á fundi 25. februar 2016 at kommunustjórin fekk heimild at undirskriva skjøl í binda kommununa.

**Lógir, ásetingar o.a.**

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Møgulig frávik/lættar frá ásetingum**

**Umhvørvisárin**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl**

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** (set x)

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |

| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |
|---|---|---|---|---|

**Fíggjarligar avleiðingar: Ja ☐ Nei ☐**

**Tilmæli:**
Borgarstjórin og kommunustjórin mæla til, at trivnaðarstjórin eisini fær heimild at medundirskriva skjøl sambært kommunustýrislógini § 44, 2, og kommunustýrisskipanini § 6, 1. petti, frá 01. mai 2019 at rokna.

**Fíggjarnevndin 10. apríl 2019:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 24. apríl 2019:** Einmælt samtykt.

# 86/19 Í sambandi við endurnýggjan av leigusáttmálanum millum TK og Ebenezer um Sloans Hús verður hesin broyttur til Sloans Savn

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 10.04.2019 | 99/19 | 19/00897-2 |
| 2 Býráðsfundur | 24.04.2019 | 86/19 | 19/00897-2 |

**Upprunin til málið:**
Ebenezer hevur havt leigusáttmála við kommununa viðv. Sloans hús.
Sáttmálin varð galdandi í 25 ár, og er frá mai 1989

**Lýsing av málinum – samandráttur**
Ì sambandi við at Ebenezer ynskir at endurnýggja leigusáttmálan, ynskir Ebenezer at Sloans hús skal hýsa einum savni við navninum “Sloans Savn”.
Ætlanin er at víðka og vaksa um savnið, sum longu er í Sloans húsi, og gera húsið til eitt veruligt søguligt minni um William G. Sloan og hansara virksemi.
Endamálið er at gera savnið nútímans við telduútgerð og øllum tí, sum hartil hoyrir.

**Lógir, ásetingar o.a.**

**Upplýsingar frá umsitingini**
Kunnandi fylgiskjal og uppskot til leigusáttmál viðheft.

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Møgulig frávik/lættar frá ásetingum**

**Umhvørvisárin**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl**

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** (set x)

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| Umsitingaravleiðingar | | | | |
| Umhvørvisavleiðingar | | | | |
| Sosialar avleiðingar | | | | |
| Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar | | | | |

| | | |
|---|---|---|
| | **Býráðsfundur**<br>24. apríl 2019 | Blað nr.: 353<br><br>Formansins merki: |

**Fíggjarligar avleiðingar:** **Ja ☐** **Nei ☐**

**Tilmæli:**
Leiðarin á stjórnarskrivstovuni og kommunustjórin mæla fíggjarnevndini til at góðkenna nýggja sáttmálan við Ebenezer, sum verður galdandi í 25 ár.

**Fíggjarnevndin 10. apríl 2019:** Samtykt at taka undir við tilmælinum, tó við teirri broyting, at leigumálið verður galdandi í 12 ár og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 24. apríl 2019:** Einmælt samtykt.

# 87/19 Nevndarlimur til Visit Tórshavn

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Býráðsfundur | 24.04.2019 | 87/19 | 19/01563-1 |

**Upprunin til málið:**
Á ársaðalfundinum í 2018 varð nýggj nevnd sett. Sambært viðtøkunum skulu 2 nevndarlimir bert verða valdir fyri 1 ár, meðan restin vórðu vald fyri 2 ár. Tá nevndin varð skipað var lutakast um, hvør varð vald fyri 1 ár og hvør fyri 2 ár av limunum, sum kommunan hevur valt. Tað er nevndarsessurin hjá Theresu Turidardóttir Kreutzmann, sum stendur fyri vali hesaferð.

**Lýsing av málinum – samandráttur**
Felagið Tórshavn hevur aðalfund 15 mai. 2019 og tá skal nevndarsessurin hjá Theresu Turidardóttir Kreutzmann setast av nýggjum. Býráðið skal velja ein nevndarlim og ein tiltakslim.

Í viðtøkunum stendur millum annað um nevndina:
*"Nevndin telur 5 limir, sum sita fyri 2 ár í senn. Annaðhvørt ár standa 2 nevndarlimir fyri vali, og annaðhvørt ár standa 3 limir fyri vali.*
*2 nevndarlimir verða valdir beinleiðis av Tórshavnar kommunu og 3 verða valdir av Felagnum Tórshavn á aðalfundi.*
*Teir 2 nevndarlimirnir, ið Tórshavnar kommuna velur, og 2 av nevndarlimunum, ið Felagið Tórshavn velur, skulu vera persónar, sum eru leiðarar ella stjórar innan ferðavinnu, handilsvinnu, matstovuvinnu og møguliga aðra vinnu, sum hevur ein viðkomandi leiklut í ferðavinnu høpi. 3. nevndarlimurin, sum Felagið Tórshavn velur, umboðar Felagið Tórshavn, og kann verða valdur millum limir felagsins ella umboðandi almennan ella privatan stovn, savn, mentanarlív ella líknandi. Nevndarlimir kunnu ikki vera býráðslimir. Nevndarlimir kunnu verða valdir aftur.*
*Fyri hvønn nevndarlim verður tiltakslimur valdur.*
*Nevndin skipar seg sjálva við formanni og næstformanni. Nevndin er viðtøkuført, tá í minsta lagi 3 limir eru á fundi, harav ein skal vera formaðurinharav annar skal verða valdur av Tórshavnar kommunu, og 3 nevndarlimir verða valdir fyri 2 ár".*

Kommunan valdi í 2018 nevndarlimir eftir lutfalsval. Tað er andstøðan, sum skal velja nevndarlim og tiltakslim hesaferð.

**Lógir, ásetingar o.a.**

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Møgulig frávik/læettar frá ásetingum**

**Umhvørvisárin**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl**

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum (set x)**

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar: Ja ☐ Nei ☐**

**Tilmæli:**
Kommunustjórin mælir Býráðnum til at velja 1 nevndarlim og 1 tiltakslim fyri Visit Tórshavn.

**Býráðsfundur 24. apríl 2019:** Theresa Turidardóttir Kreutzmann varð vald sum nevndarlimur. Rúna Erlandsdóttir varð vald sum tiltakslimur.

# 88/19 Eykajáttan til nýggj dagstovnapláss í 2019

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Mentamálanevndin | 13.03.2019 | 82/19 | 19/00945-1 |
| 2 Fíggjarnevndin | 20.03.2019 | 73/19 | 19/00945-1 |
| 3 Býráðsfundur | 28.03.2019 | 61/19 | 19/00945-1 |
| 4 Býráðsfundur | 24.04.2019 | 88/19 | 19/00945-1 |

**Upprunin til málið:**

**Lýsing av málinum – samandráttur**
Í fíggjarætlanini 2019 er roknað við í alt 145 fleiri dagstovnaplássum 0-6 ár enn í 2018. Lagt er tó ikki upp fyri teimum plássum, sum nú eru útvegaði í Hoydølum.

Í løtuni verður Býlingshúsið inni á Gøtu og Býlingshúsið í Maritugøtu útbygt, ið samlað geva 24 nýggj vøggustovupláss. Hesi pláss vórðu bjóðað út í heyst í BARN. Børnini eru byrjað í Hoydølum 1. februar, og so skjótt útbyggingarnar eru lidnar her í vár, flyta børnini til teirra stovn.

Fíggjartørvur til hesi 24 vøggustovuplássini er í alt kr. 2.081.398 fyri 2019 býtt soleiðis: konta 3119 Býlingshúsið inni á Gøtu kr. 1.040.699 og konta 3137 Býlingshúsið í Maritugøtu kr. 1.040.699.

Útbyggingarnar av ávikavist Dagstovninum á Hamrinum og Býlingshúsinum vesturi á Flat eru í útboð og ætlast arbeiðstøkusáttmálar at verða gjørdir og samtyktir í mai. Í hesum ætlanum koma uml. 88 nýggj dagstovnapláss aftrat býtt soleiðis: Dagstovnurin á Hamrinum 12 vøggustovupláss og 20 barnagarðspláss, og Býlingshúsið vesturi á Flat 36 vøggustovupláss og 20 barnagarðspláss – ella í alt 48 vøggustovupláss og 40 barnagarðspláss.
Ætlanin er beinanvegin at bjóða hesi pláss út í BARN, so skjótt endaligu loyvini til lonina í Hoydølum eru latin. Setast skulu starvsfólk, og neyðugt verður ivaleyst at taka børnini inn yvir á ávíst tíðarskeið vónandi frá 1. mai.

Fíggjartørvur til hesi plássini fyri 9 mánaðir er kr. 4.722.599 býtt soleiðis: konta 3118 Býlingshúsið vesturi á Flat kr. 3.141.824 og konta 3140 Dagstovnurin á Hamrinum kr. 1.580.775.

Í sambandi við Lonina í Hoydølum er sett daglig samskipandi leiðsla, ið ikki er fíggjað í fíggjarætlanini, men sum higartil er goldin av kontu 3215 Aðrar útreiðslur barnaansing. Umframt tørvin á funktiónini er í hesum føri eisini talan um, at kommunan er bundin til at geva leiðara, ið hevur verið í farloyvi frá leiðarastarvi í sambandi við politiskt starv, eitt sambærligt starv sum tað, hann hevði. Samlaður kostnaður er uml. kr. 540.000 fyri 2019, hetta við støði í lønarsáttmálanum millum Kommunala Arbeiðsgevarafelagið og Pedagogfelagið.

Samlað er sostatt ein eykajáttanartørvur uppá kr. 7.343.997. Vísandi til, at omanfyri nevndu 88 plássini ikki eru bjóðað út í BARN enn, skulu í øllum førum kr. 2.621.398 játtast til virksemið, sum í dag er í Hoydølum, leiðaraløn íroknað.

Játtan er ikki tøk til endamálið á grein 3 Børn og ung í fíggjarætlanini.

**Lógir, ásetingar o.a.**

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Møgulig frávik/læHtar frá ásetingum**

**Umhvørvisárin**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl**

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** (set x)

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** **Ja ☐** **Nei ☐**

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og leiðarin á barna- og ungdómsdeildini vísa á eykajáttanartørvin og mæla til beinanvegin at játta kr. 2.621.398 sum eykajáttan soleiðis: konta 3119 Býlingshúsið inni á Gøtu kr. 1.040.699, konta 3137 Býlingshúsið í Maritugøtu kr. 1.040.699, og konta 3215 Aðrar útreiðslur kr. 540.000.

Harumframt verður mælt til at játta aðrar 4.722.599 sum omanfyri lýst til plássini, ið ætlast at byrjað í Hoydølum seinni í vár.

Fyrisitingin hevur ikki játtan at vísa á innan grein 3 í fíggjarætlanini.

**Mentamálanevndin 13. mars 2019**: Samtykt at mæla fíggjarnevndini til at játta kr. 2.625.000 sum eykajáttan at býta soleiðis: konta 3119 Býlingshúsið inni á Gøtu kr. 1.042.500, konta 3137 Býlingshúsið í Maritugøtu kr. 1.042.500, og konta 3215 Aðrar útreiðslur kr. 540.000.

**Fíggjarnevndin 20. mars 2019:** Samtykt at taka undir við Mentamálanevndini og játta kr. 2.625.000 av tøkum peningi, og beina málið í býráðið til tvær viðgerðir.

**Býráðsfundur 28. mars 2019:** Einmælt samtykt.

**Býráðsfundur 24. apríl 2019:** Einmælt samtykt.

# 89/19 Tórshavnar Golfklubbi: Umsókn um stuðul til byggjan av golfvølli og felagshúsi gl. j. nr. 10/27.1991 (1999-1642)

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Mentamálanevndin | 20.10.2014 | 201/14 | 14/04756-36 |
| 2 Mentamálanevndin | 05.04.2017 | 81/17 | 14/04756-36 |
| 3 Mentamálanevndin | 13.09.2017 | 221/17 | 14/04756-36 |
| 4 Mentamálanevndin | 04.10.2017 | 233/17 | 14/04756-36 |
| 5 Fíggjarnevndin | 18.10.2017 | 231/17 | 14/04756-36 |
| 6 Fíggjarnevndin | 15.11.2017 | 260/17 | 14/04756-36 |
| 7 Býráðsfundur | 22.11.2017 | 262/17 | 14/04756-36 |
| 8 Mentamálanevndin | 30.01.2019 | 32/19 | 14/04756-36 |
| 9 Fíggjarnevndin | 31.01.2019 | 29/19 | 14/04756-36 |
| 10 Býráðsfundur | 31.01.2019 | 10/19 | 14/04756-36 |
| 11 Býráðsfundur | 28.03.2019 | 64/19 | 14/04756-36 |
| 12 Mentamálanevndin | 24.04.2019 | 139/19 | 14/04756-36 |
| 13 Fíggjarnevndin | 10.04.2019 | 104/19 | 14/04756-36 |
| 14 Fíggjarnevndin | 24.04.2019 | 116/19 | 14/04756-36 |
| 15 Býráðsfundur | 24.04.2019 | 89/19 | 14/04756-36 |

## Málslýsing:

Ætlanin er, at stórur partur av flagnum og undirliggjandi tilfar frá Tórsvølli skal flytast út á golføkið á Glyvursnesi. Tað verður Tórshavnar Golfklubbi, sum ger neyðugu fyrireikingarnar at taka ímóti nógva tilfarinum. Partur av hesum er at leggja dren, at javna økið og leggja onkran arbeiðsveg.

Í hesum sambandi søkir Golfklubburin um at leysgeva part av játtanini à 3,3 mió kr., sum felagið fekk í stuðli í 1999. Søkt verður um 250.000 kr. Sjálvt arbeiðið at leggja flagið verður gjørt vi sjálvbodnum arbeiði.

Útreiðslur í sambandi við flutning frá Tórsvølli verður fíggjað av Tórsvallar-verktætlanini. Í útboðstilfarinum skal lýsast neyvt, hvussu flag og tilfar skal fáast upp og leverast á Glyvursnesi, so at klubburin kann arbeiða hetta víðari.

Nevnda játtan á 3,3 mió er ikki beinleiðis tøk á fíggarætlanini, og rúm er ikki fyri játtanini á kontu 5370 Stuðul til íløgur. Hinvegin er játtan 5 mió kr. sett av á íløguætlanini til golfvøll. Av tí at hetta arbeiðið er at meta sum partur av nýggjum golfvølli, er skilabest, at stuðulin verður játtaður av hesi játtan.

**Tilmæli**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla til at játta Tórshavnar Golfklubba 250.000 kr. í stuðli til at gera fyrireikingar úti á Glyvursnesi at leggja flag og tilfar frá Tórsvølli av kontu 5775 Ítróttaranlegg.

**Mentamálanevndin 29. mars 2012:** Sambært nýggjari kostnaðarmeting verður fíggjartørvurin hjá felagnum til fyrireikingararbeiðið á Glyvursnesi 400.000 kr., og nevndin samtykti at mæla býráðnum um fíggjarnevndina at játta Tórshavnar Golfklubba upp til hesa upphædd av kontu 5775 Ítróttaranlegg.

**Fíggjarnevndin 29. mars 2012:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við mentamálanevndini og at játta Tórshavnar Golfklubba upp til 400.000 kr. av konto 5775 Ítróttaranlegg.

**Býráðið 29. mars 2012:** Einmælt samtykt

**Ískoyti:**
Neyðugt er nú av álvara at seta gongd á fyrireikingarnar til golfbreyt á Glyvursnesi, skal breytin verða liðug í góðari tíð undan oyggjaleikum.

Gjørd er arbeiðsætlan, har eisini Tórshavnar Golfklubbi og Ítróttasamband Føroya taka lut í fyrireikandi arbeiðinum. Arbeiðið í hesum fyrsta stiginum fevnir serliga um at fáa avklárað lendisspurningin, um at menna konsept fyri sjálva golfbreytina bæði ítróttaliga, arkitektoniskt, umhvørvisliga (eitt nú burðardygg vatnveiting, flora v.m.), ferðavinnuliga og fíggjarliga, herundir skipan av rakstri, rakstrarætlan og møguleikar fyri eksternari íløgufígging, og um samstarv við útlendskar partar og serfrøði bæði í Skottlandi, Íslandi og Danmark, har fleiri viðkomandi sambond longu eru knýtt.

Annað áleikandi mál er, at ferðslan eftir vegnum frá Hamrinum og til golfvøllin á Glyvursnesi er nógv økt. Vegurin er tó í slíkum standi, at tað gevur teim koyrandi trupulleikar. Gjørd er kostnaðarmeting at fáa lagt avfresað asfalt eftir vegnum, og kemur hetta at kosta um kr. 50-75.000.

Á íløgukontu 5775 ítróttaranlegg eru kr. 4,6 mió tøkar til golfbreyt. Til tess at fáa fyrireikingarnar í gongd verður mett neyðugt við játtan kr. 500.000, harav játtan eisini kann verða brúkt til avfresa asfalt í mesta lagi upp til kr. 75.000.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla til at játta kr. 500.000 av kontu 5775 ítróttaranlegg til L57016 Golfvøllur ætlað omanfyri nevndu endamálum.

**Mentamálanevndin 10. oktober 2012:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 24. oktober 2012:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við mentamálanevndini.

**Býráðið 1. november 2012:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Sambært roknskaparkunngerðini, sum fekk gildi fyri Tórshavnar kommunu 1. januar 2010, skulu tilsagnir um stuðul rakstrarførast í tí ári, tær eru latnar, og upphæddin skal innroknast sum ein skylda í ársroknskapinum. Í grannskoðaraprotokollini fyri ársroknskapin hjá kommununi fyri árið 2011 er tann viðmerking, at játtanin í hesum máli kr. 3,3 mió kr. á kontu 5370 Stuðul til íløgur er ikki innroknað í roknskapin, men einans upplýst sum skylda.

Grannskoðaraprotokollin mælir til, at omanfyri nevnda tilsøgn, sum er frá 1999, verður viðgjørd av nýggjum.

Stuðulin var í síni tíð játtaður felagnum til at byggja ein golfvøll ovaliga í Hoyvík. Henda ætlan er ikki longur aktuel. Hinvegin hevur býráðið sett í gongd verkætlan at fyrireika og byggja

golfvøll á Glyvursnesi, sí kontu 5775 Ítróttaranlegg L57016 Golfvøllur. Vísandi til, at upprunatilsøgnin 3,3 mió vórðu ætlaðar til golfvøll, verður mælt til, at henda játtanin verður broytt og játtað til aktuellu verkætlanina á Glyvursnesi.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla til at broyta tilsøgnina um stuðul kr. 3,3 mió soleiðis, at upphæddin verður játtað til kontu 5775 L57016 Golfvøllur.

**Mentamálanevndin 17. desember 2012:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 16. januar 2013:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við mentamálanevndini.

**Býráðið 24. januar 2013:** Einmælt samtykt.

**Býráðið 21. februar 2013:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Arbeiðsbólkur hevur saman við golfvallararkitekti fyrireikað og ment uppskot til konsept fyri golfvølli á Glyvursnesi. Harumframt er gjørt eitt verkætlanaruppskot, herundir designuppskot til golfvøll við 18 holum og driving range v.m. við kostnaðarmeting og tíðarætlan fyri íløguna, umframt rakstrarmeting, sí frágreiðing latin býráðnum í juni 2013.

Frágreiðingin gevur somuleiðis eina innleiðslu í golf sum ítrótt og frítíðarítriv, møguleikarnar á Glyvursnesi eins og tey atlit, sum tikin eru í mun samfelagsliga, fíggjarliga og umhvørvisliga burðardygd.

Verkætlanin er tengd at ætlanini um oyggjaleikir í Føroyum í 2019, sum tíðarætlanin tí byggir á, men alt verkætlanaruppskotið røkkur longri og breiðari enn tað og vísir m.a. á teir ágóðar, sum golfvøllurin kann hava fyri ferðavinnuna.

Víst verður somuleiðis á, hvussu golfvøllurin endurskapar lendið, sum í sjónligan mun er ávirkað av grótbrotinum, og hvussu verkætlanirnar við golfvølli og útbyggingin av Tórshavnar havn kunnu samskipast og fáa gagn av hvør aðrari. Grótbrotið ætlast brúkt til venjingarvøll, viðlíkahaldsbygningar og parkering v.m. Neyðugt verður tí at broyta avgerðina um at brúka grótbrotið til tyrvingarpláss og onnur staðseting av tyrvingarplássi finnast.

Til tess at koma víðari, er neyðugt við prinsippgóðkenning av verkætlanaruppskotinum, herundir at fáa gjørt ráðgevaraavtalu við golfvallar-arkitektin, sum lið í klárgering til útboð og arbeiðstøkur. Samstundis verður arbeitt við at fáa neyðugu loyvini til lendið. Harumframt skal setast bygginevnd.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin, tekniski stjórin og mentamálaleiðarin mæla til prinsippgóðkenning av konsept- og verkætlanaruppskotinum, at gjørd verður ráðgevaraavtala við golfvallararkitektin, og at sett verður bygginevnd til verkætlanina.

**Mentamálanevndin 13. juni 2013:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og fara í samráðingar við landsmyndugleikarnar um tess lut í verkætlanini.

**Fíggjarnevndin 19. juni 2013:** Samtykt at taka undir við mentamálanevndini.

Jógvan Arge luttók ikki í viðgerðini av hesum máli.

**Býráðið 26. juni 2013:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Limirnir í staðbundnu nevndini ynskja hetta málið á skrá.

**Kirkjubøar- og velbastaðarnevndin 09. September 2013:** Kunnað varð um málið.

- Kunning.

**Mentamálanevndin 10. september 2013:** Kunnað varð um málið.

**Mentamálanevndin 20. oktober 2014:** Kunnað varð um málið.

**Ískoyti:**
Síðst í juni 2013 sendi Tórshavnar kommuna umsókn til Búnaðarstovuna um at leiga uml. 630.000 fermetra stórt lendi á Glyvursnesi til golfvøll, hetta samsvarandi heimild í lógini um landsjørð § 7a.

Liðin eru skjótt fýra ár, har samráðingar hava verið millum Tórshavnar kommunu og Fiskimálaráðið øðrumegin og festararnar hinumegin. Upprunaavtalan var, at landið skuldi bera endurgjaldskostnaðin, meðan kommunan bar útreiðslurnar at byggja vøllin.
Enn hevur ikki borið til at finna semju um endurgjaldið til tann festaran, sum skal flyta virksemið av økinum og longur suður. Eftir áheitan tilnevndi sorinskrivarin uttanveltaðan metingarmann, men semja fekst heldur ikki um sýns- og metingarskránna, ið er sjálv grundarlagið fyri metingini hjá metingarmanninum.

Ongar veruligar samráðingar hava verið síðani í fjør vár. Í samgonguskjalinum hjá býráðsmeirilutanum er skrivað, at saman við Tórshavnar Golffelag verður farið undir at gera eina heildarætlan fyri golfvølli á Glyvursnesi. Í hesum sambandi verður málið nú tikið uppaftur.

Sum framgongur av málinum omanfyri, fyriliggur eitt verkætlanaruppskot um golfvøll við 18 holum, umframt driving range, ið er staðsett í fyrra grótbrotinum. Uppskotið stóð Edwin Roald, viðurkendur íslendskur golfvallararkitektur, fyri í samstarvi við kommununa og Golffelagið. Sí hjáløgdu verkætlanarlýsing.

Vøllurin skuldi tá byggjast í einum yvir eitt stutt áramál, tí hann skuldi verða liðugur til Oyggjaleikir 2019. Hetta er ikki longur aktuelt, og tí ber til sum liður í heildarætlan at skipa tilgongdina at byggja golfvøllin øðrvísi og yvir longri tíð.

Hetta er tilgongd, ið Golffelagið sjálvt vísir á sum gongda leið eitt nú soleiðis, at 1-2 hol (breytir) verða bygd hvørt árið, og har ávís upphædd samsvarandi verður sett á íløguætlanina.

Til tess at koma víðari, verður mett neyðugt, at samráðingarnar um leigu av lendinum og endurgjald tí viðvíkjandi verða tiknar uppaftur soleiðis, at málið verður loyst skjótast. Harumframt at heita á golfvallararkitektin um at gera eitt tillagað uppskot til heildarætlan og verkætlanartilgongd, har bygt verður yvir longri tíð, og at settur verður verkætlanarbólkur við umboðum fyri kommununa og golffelagið.

Eingin játtan er tøk til golfvøll á íløguætlanini, men mett verður, at hetta fyrsta fyrireikandi tíðarskeiðið kann haldast innan verandi rakstrarkarmar, og at íløgujáttan verður at koma á fíggjarætlanini frá 2018.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla til at taka uppaftur samráðingarnar um leigu av lendinum til golfvøll. Harumframt verður mælt til at heita á golfvallararkitektin, sum í 2013 gjørdi uppskotið til golfvøll, um at gera eitt tillagað uppskot til heildarætlan og verkætlanartilgongd, har bygt verður yvir longri tíð, og at settur verður verkætlanarbólkur við fimm umboðum, har fyrisitingingarnar hava hvør sítt og Tórshavnar Golffelagið hevur tvey.

**Mentamálanevndin 05. apríl 2017:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Ískoyti:**
Uppskot til heildarætlan og yvirskipaða verkætlartilgongd verður lagt fram.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla til at umrøða uppskotið.

**Mentamálanevndin 13. september 2017:** Umrøtt.

**Ískoyti:**
Víst verður til uppskotið til tillagað verkætlan um bygging av golfvølli, ið løgd varð fram í mentamálanevndini 13. september 2017.

<u>Golfvøllur við 9 holum fyrst</u>
Sbrt. uppskotinum verður hildið fast við heildarætlan um golfvøll við 18 breytum/holum á Glyvursnesi, men har mælt verður til bygging í stigum, har fyrsta stigið er at byggja níggju hol

árini 2018-2022, og at tað eftir hetta verður tikin støða til, hvørt farast skal víðari at byggja vøllin út til 18 hol beinanvegin ella seinni.

Fyri at skipa byggiarbeiðið best er tilmælið, at trý hol verða bygd um árið uttan íhald soleiðis, at tað í 2022 eru 9 hol tøk. Hetta hevur eisini tann ítróttaliga fyrimun, at til ber at spæla golf samstundis, har tey fyrstu trý holini væntandi eru klár í 2020, seks hol í 2021 og níggju hol í 2022.

Verkætlanarbólkurin, sum eru fyrisitingarstjórarnir og tvey umboð fyri golffelagið, tekur undir við hesi tilgongd. Henda bygging kann í stórum øll fremjast í tí syðra økinum av Glyvursnesi, sum sambært byggisamtyktini longu er lagt út sum D2 økið, tvs. ítróttarøki. Hetta økið er uml. 270.000 m2.

Kommunan sendi í 2013 samsvarandi áseting í grein 7a í lóg um landsjørð umsókn til Búnaðarstovuna um at leiga uml. 630.000 m2 stórt lendi á Glyvursnesi til golfvøll við 18 holum. Við broyttu tilgongdini, har byrjað verður at byggja 9 hol, ber til at tillaga umsóknina um leigu soleiðis, at økið bert fevnir um teir uml. 270.000 m2.

<u>Integrera golfvøll við tyrving og havnarútbygging</u>
Sum liður í heildarætlanini fyri golfvølli við 18 holum, verða í frágreiðingini eisini umrøddir møguleikar at integrera golfvallarútbyggingina bæði við tyrvingarætlanina og við arbeiðið hjá Tórshavnar havn í nýggja grótbrotinum, har mett verður, at til ber at skapa felags ágóðar bæði fíggjarliga, umhvørvisliga og samfelagsliga.

Fyri golfvøllin ítøkiliga vil tað eitt nú merkja, at til ber at byggja suðureftir, har lendið er ikki so avbjóðandi sum á norðara partinum, og inn í umskapaðu grótbrotini og harvið spara lendi. Í frágreiðingini verður víst á dømi úti í heimi tí viðvíkjandi, og mælt verður til, at ymsu kommunalu áhugapartarnir og polilitiska skipanin viðgera perspektivini í hesum.

Verkætlanarbólkurin tekur sum heild undir við hesi tilgongd, men ásannandi, at talan er um viðurskifti, sum kunnu taka langa tíð, verður mælt til, at politiska skipanin setir út í kortið heildarætlan fyri Glyvursnes, harundir, hvat gerast skal við grótbrotini og møguliga integratión við golfvøllin.

<u>Smart Range</u>
Eisini sum liður í at spara lendi í fyrsta byggistigi, verður í frágreiðingini skotið upp at fáa til vega sonevnt Smart Range, sum er innandura golfsimulator. Smart Range er tilgild loysn, sum í ávísan mun kann koma í staðin fyri ella supplera ein vanligan driving range, sum er stórur og lendiskrevjandi venjingarvøllur.

Fyrimunur við Smart Range er harumframt, at tað nýskapandi háttur at introdusera golfspælið bæði til børn, vaksin og eldri, at skapa forvitni og draga nýggjar íðkaðar til føroyska golfumhvørvið. Ein Smart Range kann setast upp í hølum so at siga hvar sum helst.

Verkætlanarbólkurin tekur undir við at fáa til vega Smart Range í øllum førum sum partur av fyrsta byggistigið.

<u>Tíðarætlan og kostnaðarætlan</u>
Uppskotið er, at verkætlanin í 2018 verður nærri prosjekterað og designað, at byrjað verður at byggja trý tey fyrstu holini, og at Smart Range verður sett upp í býnum. Í 2019 verða hesi holini gjørd liðug og byrjað verður uppá trý tey næstu. Og so heldur arbeiðið fram soleiðis, at øll tey níggju holini eru liðug og klára at spæla á í 2022.

Samlaði kostnaðurin er mettur til uml. kr. 27 mió, har metti tørvurin fyri 2018 er kr. 4 mió. Harumframt skulu gerast gøtur og amboðsbygningur.

Verkætlanarbólkurin tekur undir við tíðarætlanaruppskotinum, sum tó má taka støði í teirri fígging, ið játtað verður til golfvøllin hesi árini. Í løtuni er eingin fígging sett av til endamálið burtursæð frá teimum kr. 300.000, ið settar eru av til fyrireikingar í inniverandi fíggjarári.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla til, at:

- uppruna golfvallarætlanin verður tillagað soleiðis, at bygdur verður golfvøllur við 9 holum, men tó so, at tað skal bera til at byggja vøllin út til 18 hol seinni
- senda Búnaðarstovuni nýggja umsókn um leigu av lendi svarandi til syðra D2-økið á Glyvursnesi, í alt uml. 270.000 m2, ætlað til golfvøll við 9 holum
- fáa til vega nærri politiska støðutakan til møguleikan at integrera næsta byggistig til 18 hol við grótbrotini og samskipast við aðrar kommunalar verkætlanir har til tess at skapa felags ágóðar sum liður í heildarætlan fyri Glyvursnes
- fyrireika útvegan av Smart Range, og at
- ætlan fyri fígging verður løgd í sambandi við langtíðaríløguætlanina.

**Mentamálanevndin 04. oktober 2017:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

Heðin Mortensen var ikki við í viðgerðini av hesum málið.

**Fíggjarnevndin 18. oktober 2017:** Útsett.

**Fíggjarnevndin 15. november 2017:** Samtykt at taka undir við mentamálanevndini og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 22. november 2017:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Tekstur kemur seinni.

**Mentamálanevndin 30. januar 2019:** Kunnað varð um málið.

**Fíggjarnevndin 31. januar 2019:** Útsett.
**Býráðsfundur 31. januar 2019:** Tikið av skrá.

**Ískoyti:**
Tilfar kemur.

**Býráðsfundur 28. mars 2019:** Útsett

**Fíggjarnevndin 10. apríl 2019:** Tikið av skrá**.**

**Ískoyti:**
Við støði í løgtingslóg um landsjørð § 7a hevur kommunan tvær ferðir søkt Búnaðarstovuna um at leiga lendi á Glyvursnesi til golfvøll. Nevnda lógargrein ásetir, at Búnaðarstovuni verður heimilað at taka aftur nýtslurætt frá festara til lendið, tilhoyrandi festi, og leiga kommunu lendið til almannagagnligt endamál. Verður nýtslurættur til lendið tikin aftur, skal kommunan rinda fult endurgjald.

Fyrru ferð var í juni 2013, tá býráðið tók undir við verkætlanaruppskoti um golfvøll við 18 holum við samlaðum lendistørvi uppá uml. 630.000 m2, har nógv tann størsti parturin er í Glyvurshaga (festari Sjúrður Patursson), ein nógv minni partur í Kirkjubøhaga fyri handan (festari Poul Müller), umframt táverandi grótbrot.

Frammanundan høvdu landsstýrið og kommunan avtalu um, at landið skuldi bera part av endurgjaldinum til festaran. Í tí sambandi játtaði løgtingið kr. 4 mió í fíggjarlógini 2015 til endamálið. Samráðingarnar um endurgjald bóru ikki á mál, og játtanin í fíggjarlógini er síðani dottin burtur.

Í 2017 varð lagt fyri býráðið tillagað verkætlanaruppskot um golfvøll við í fyrsta umfari 9 holum, sum allur kundi gerast innanfyri verandi byggisamtykt í Glyvurshaga. Við støði í hesum varð søkt av nýggjum um lendi stórt uml. 270.000 fermetrar í Glyvurshaga.

Samráðingar vórðu tiknar upp aftur í 2018. Avtalað varð í hesum sambandi at taka støði í lendistørvi, ið svarar til ein golfvøll við 18 holum, tí hetta kortini verður endamálið.

Tó er í hesum umfari valt at avgreiða viðurskiftini við Glyvurshaga fyrst, sum eisini er nógv mest umfevnandi bæði viðvíkjandi avleiðingum fyri virki festarans og sjálvari endurgjaldsupphæddini. Tá golfvallarverkætlanin komandi árini er neyvari ment og projekterað, kann nýggj meting gerast um tørvin at leiga ávíst lendi í Kirkjubøhaga fyri handan eisini.

Vísandi til broyttu umstøðurnar á Glyvursnesi, har kommunan keypti lendið til nýtt grótbrot í sambandi við havnarútbyggingina, vil Búnaðarstovan hava kommununa at keypa gamla grótbrotið úr festinum. Hetta er somuleiðis tikið við í sáttmálauppskotið.

Sáttmálapartarnir eru Búnaðarstovan, festarin Sjúrður Patursson og Tórshavnar kommuna.

**Sáttmálauppskotið um lendi til golfvøll**
Gjørt er kort yvir Glyvursnes, sum lýsir stødd á lendi, longdir á nýggjari girðing, uppdyrkingarvegi o.a., sum ymisk endurgjøld taka støði í, sí fylgiskjal 1 í sáttmálunum. Eisini framgongur staðseting av nýggjum seyðahúsi, nýggjum dyrkaðum lendi v.m.
Við hesum sáttmálanum leigar kommunan í alt 522.000 m2 í 30 ár. Leigumálið kann leingjast. Festarin missir við hesum nýtslurættin til hetta lendið, og tí er neyðugt hjá festaranum at flyta alt virksemið av økinum. Í hesum sambandi skal endurgjaldast fyri at velta upp úr nýggjum uml. 46.000 m2, gera nýggjan uppdyrkingarveg 578 m og nýggjar girðingar í alt uml. 4.000 m. Eisini skal endurgjaldast fyri mist bit. Endurgjøld fyri øll hesi viðurskifti er uml. kr. 3,1 mió.

Gjørt verður harumframt gerðabýti fyri fastar ognir. Kommunan yvirtekur verandi seyðahús og maskinhøll hjá festaranum. Festarin byggir nýtt seyðahús við maskinhøll 13,6 x 34 m, ið er kostnaðarmett til uml. kr. 6 mió., ið kommunan skal endurgjalda.

Haraftrat keypir kommunan gamla grótbrotið, sum er uml. 66.000 m². Tá dagsvirðið av áður inngoldnum gjøldum fyri tøku av gróti í gamla grótbrotinum tíðarskeiðið 1986-2016 er drigin frá, verður keypskostnaðurin uml. kr. 612.000.

Samlaða virði av sáttmálanum er kr. 9.843.016, ið skulu falla til gjaldingar í fjórðingum árini 2019-2022, tað er uml. kr. 2,46 mió um árið.

Leigusáttmálin fyri lendið kostar í løtuni kr. 5.000 um árið. Hóast sáttmálin verður settur í verk í ár, hevur festarin nýtslurætt av bygningum og lendi til í seinasta lagi 31.

desember 2022, tá øll arbeiði festarans sambært sáttmálanum skulu vera avgreidd. Kommunan skal seta upp girðing kring golfvøllin uml. 1.350 m. Henda útreiðsla, sum mett er til uml. kr. 200.000, er ikki partur av sáttmálanum.

Sáttmálin er endaliga treytaður av øðrum myndugleikaloyvum og krøvum, harundir friðingar- og byggimyndugleikum.

Sum lýst omanfyri varð avtalað gjørd við landsstýrið um fígging av endurgjaldinum. Nú sáttmáli eftir ætlan verður gjørdur um hesi viðurskifti, eigur kommunan at taka málið um fígging av endurgjaldinum uppaftur við landsstýrið til tess at staðfesta, um landsstýrið stendur við hesa avtalu. Hetta hevur aftur týdning fyri, hvør endaliga endurgjaldsupphæddin hjá kommununi verður at fíggja. Verður upphæddin tann sama, sum løgtingið játtaði í 2015, er fíggjartørvurin hjá kommununi til endurgjaldið kr. 5,85 mió, ella uml. kr. 1,46 mió um árið. Hetta verður tó ikki staðfest enn.

**Víðari verkætlanartilgongd**
Tá sáttmálin er góðkendur endaliga av øllum pørtum, ber til hjá kommununi at arbeiða meira ítøkiligt við golfvallarverkætlanini. Fram til og við 2022 verður ítøkiligt lendisarbeiði tó at samskipa við virksemi festarans á økinum.

Næsta stig er at gera ráðgevarasáttmála við golfvallararkitektin, har fyrstu arbeiðini verða prosjektering av lidnum golfvallarsniði samsvarandi ætlaðum byggistigum, harundir kostnaðarætlan býtt yvir ár. Seinni skal støða takast til, hvussu farast skal fram viðvíkjandi útbjóðing av lendisarbeiði v.m.

Í hesum sambandi skulu eisini neyðug loyvi frá friðingarmyndugleikum og byggimyndugleikanum fáast til vega. Býráðið hevur samtykt at broyta byggisamtyktina fyri Glyvursnes ætlað golfvølli, har ávíst øki á Glyvursnesi verður broytt til D2 øki (mál 19/00427). Málið er í løtuni til almenna hoyring.

Higartil hava tvey umboð fyri Tórshavnar Golffelag tikið lut í arbeiðsbólki saman við kommununi. Uppgávan hevur í høvuðsheitum verið samskipan og at fáa til vega tey bæði verkætlanaruppskotini, ið gjørd eru. Mett verður skilagott, at umboð fyri golffelagið halda fram í víðari menningini av golfvallarverkætlanini. Sjálv verkætlanin verður leidd av verkætlanardeildini.

**Fígging**
Á løgukontu 5775 Ítróttaranlegg L57016 Golfvøllur eru kr. 147.000 tøkar. Í málið 19/00144 er raðfest játtan til golfvøll o.a. kr. 1.050.000 á L57016 Smærri ítróttaranlegg. Írestandi fíggjartørvur til tess at rinda endurgjaldið í inniverandi ári er kr. 1.264.000. Skotið verður upp,

at hetta verður fíggjað við at flyta kr. 1 mió. av framfluttum løgukarmi konta 7175 ætlað renovatión, og kr. 264.000 av løgukarmi 5775 ítróttaranlegg.

Í langtíðar íløguætlanini er lagt upp til fígging til golfvøll. Umframt fígging til endurgjaldið, eigur hædd eisini at takast fyri fígging til at prosjektera og byggja sjálvan golfvøllin.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla til at samtykkja sáttmálan um lendi til golfvøll á Glyvursnesi og í hesum sambandi at játta kr. 2.460.754 hvørt árið 2019, 2020, 2021 og 2022 á kontu 5775 ítróttaranlegg L57016 Golfvøllur til tess at fíggja endurgjaldið sambært sáttmálanum.

Mælt verður eisini til, at gjaldið fyri 2019 verður fíggjað soleiðis:

- kr. 147.000 á løgukontu L57016 Golfvøllur
- kr. 1.050.000 av raðfestari játtan til golfvøll o.a. á løgukontu L57029 Smærri ítróttaranlegg
- kr. 264.000 av løgukarmi 5775 ítróttaranlegg
- kr. 1.000.000 av framfluttum løgukarmi konta 7175 ætlað renovatión.

Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla harumframt til at heita á landsstýrið um fígging til endurgjald samsvarandi avtaluni við kommununa tí viðvíkjandi.

**Mentamálanevndin 24. apríl 2019:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið til tvær viðgerðir í býráðið um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 24. apríl 2019:** Samtykt at taka undir við mentamálanevndini og beina málið í býráðið til tvær viðgerðir.

**Býráðsfundur 24. apríl 2019**: Einmælt samtykt**.**
Marin Katrin Frýdal fór av fundinum vegna ógegni og luttók ikki í viðgerðini av málinum.

## 90/19 Nýggjur umlættingar- og rehabiliteringsdepil

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Eldranevndin | 02.10.2017 | 19/17 | 17/03195-1 |
| 2 Fíggjarnevndin | 18.10.2017 | 229/17 | 17/03195-1 |
| 3 Býráðsfundur | 26.10.2017 | 239/17 | 17/03195-1 |
| 4 Byggi- og býarskipanarnevndin | 07.03.2018 | 42/18 | 17/03195-1 |
| 5 Eldranevndin | 09.04.2018 | 1/18 | 17/03195-1 |
| 6 Fíggjarnevndin | 18.04.2018 | 95/18 | 17/03195-1 |
| 7 Býráðsfundur | 24.04.2018 | 75/18 | 17/03195-1 |
| 8 Eldranevndin | 04.06.2018 | 2/18 | 17/03195-1 |
| 9 Fíggjarnevndin | 13.06.2018 | 171/18 | 17/03195-1 |
| 10 Býráðsfundur | 20.06.2018 | 147/18 | 17/03195-1 |
| 11 Eldranevndin | 10.09.2018 | 9/18 | 17/03195-1 |
| 12 Fíggjarnevndin | 19.09.2018 | 254/18 | 17/03195-1 |
| 13 Býráðsfundur | 27.09.2018 | 211/18 | 17/03195-1 |
| 14 Eldranevndin | 05.11.2018 | 15/18 | 17/03195-1 |
| 15 Tekniska nevnd | 27.11.2018 | 77/18 | 17/03195-1 |
| 16 Byggi- og býarskipanarnevndin | 28.11.2018 | 248/18 | 17/03195-1 |
| 17 Fíggjarnevndin | 28.11.2018 | 332/18 | 17/03195-1 |
| 18 Býráðsfundur | 29.11.2018 | 270/18 | 17/03195-1 |
| 19 Eldranevndin | 19.03.2019 | 2/19 | 17/03195-1 |
| 20 Eldranevndin | 27.03.2019 | 9/19 | 17/03195-1 |
| 21 Fíggjarnevndin | 28.03.2019 | 94/19 | 17/03195-1 |
| 22 Býráðsfundur | 28.03.2019 | 65/19 | 17/03195-1 |
| 23 Fíggjarnevndin | 10.04.2019 | 103/19 | 17/03195-1 |
| 24 Fíggjarnevndin | 24.04.2019 | 117/19 | 17/03195-1 |
| 25 Býráðsfundur | 24.04.2019 | 90/19 | 17/03195-1 |

**Málslýsing:**
Víst verður til virkisætlan og tilmæli latin eldranevndini 11. september 2017 (j.nr. 17/00586), har tað m.a. verður mælt til at byggja nýggjan depil til umlætting og samdøgursrehabilitering. Hetta tilmælið verður niðanfyri útgreinað.

Mett verður skilabest við depli við 30 plássum, sum í høvuðsheitum kunnu býtast í 10 samdøgursrehabiliteringspláss og 20 umlættingarpláss, ið tó skal hugsast fleksibult eftir tørvinum hjá brúkarunum.

Í løtuni hevur heilsu- og umsorganartænastan 11 umlættingarpláss og 5 samdøgursrehabiliteringspláss.

Samdøgursrehabiliteringspláss eru stutttíðarpláss til eldri fólk, sum við tilboði um endurmenning í styttri tíðarskeið kunnu fara heim aftur til sín sjálvs at búgva, møguliga stuðlað við heimahjálp. Til samdøgursrehabilitering verður dentur lagdur á at endurmenna búfólkini og geva hjálp til sjálvhjálp gjøgnum venjing og annað.

Rehabiliteringstíðarskeiðið kann vera ymiskt alt eftir støðuni hjá einstaka borgaranum.

Umlættingarpláss eru eisini stutttíðarpláss til eldri fólk, sum búgva heima, men eru illa fyri. Tey koma til umlætting fyri at lætta um hjá avvarðandi, sum eru við til at taka sær av teimum í heiminum. Til ber at fáa afturvendandi umlætting, um mett verður, at tørvur er á tí. Tað er rættiliga vanligt, at fólk, sum fær tillutað fast røktarbúpláss, fyrst hevur verið til umlætting. Umlættingartíðarskeiði kann vera ymiskt alt eftir tørvi.

Umframt at vera týðandi tilboð til borgararnar, hava enn fleiri stutttíðarpláss til umlætting og rehabilitering stóran skipanarligan týdning fyri skipan av samlaðu heimatænastuni, harundir starvsfólkatørv, og til ber betri at tálma tørvin á nýggjum røktarheimsplássum. Tað ber eisini betri til at taka ímóti bráðfeingis støðum, liðugt viðgjørdum sjúklingum v.m., og somuleiðis kunnu fleiri stutttíðarpláss tryggja betur visitatión.

Nýggi umlættingar- og rehabiliteringsdepilin er hugsaður sum ein deild, har mestsum øll umlætting og samdøgursrehabilitering í Heilsu- og umsorganartænastuni fer fram.
Við hesi støðd fæst bæði fakligur og tænastuligur fleksibilitetur og skynsamur rakstur.

Í dag fáa umleið 40 fólk um árið gagn av tilboðnum um samdøgursrehabilitering, og vanliga standa eini 10 fólk á bíðilista. Við at økja plássini til 10 pláss, skuldi rúm verið fyri, at 80 heimabúgvandi um árið kunnu brúka samdøgursrehabiliteringstilboðið.

Viðvíkjandi umlætting, so kunnu 10 av teim 30 plássunum verða nýtt til fólk, sum hava afturvendandi tørv á umlætting t.d. 3-4 ferðir um árið. Tá vilja millum 30 og 40 fólk gagnnýta hesi 10 plássini. Higartil í ár (sept. 2017) hevur Heilsu- og umsorganartænastan fingið 224 áheitanir um umlætting. Hetta er bæði frá borgarum, sum hava fingið umlætting í ár, og frá borgarum, sum senda áheitan fyrstu ferð.

Heilsu- og umsorganartænastan hevur veitt umlætting 157 ferðir í ár. Longdin á teimum 157 umlættingunum, sum hava verið higartil í ár, er ymisk. Tað vil siga, at higartil í ár eru 67 áheitanir, sum ikki eru gingnar á møti.

Restina av teimum 30 plássunum, t.e. eisini 10 pláss, kunnu brúkast til bráðfeingispláss, liðugt viðgjørdar sjúklingar, sonevnd metingarpláss og onnur, sum hava ikki so ofta tørv á umlætting, t.d. bert eina til tvær ferðir um árið.

Upplagt er, at liðugt viðgjørdir sjúklingar, sum ikki kunnu fara heim av sjúkrahúsinum, koma á depilin til metingar og til uppvenjing, har tað betri ber til at meta um og staðfesta, hvørt borgarin kann fara heim ella skal hava búpláss á røktarheimi.

Hesin býtislykil millum rehabilitering, umlætting og bráðfeingis pláss er ikki endaligur, men skal júst vera fleksibul í mun til áleikandi tørv.

Við deplinum er møguligt at flyta verandi umlættingarpláss, t.e. 2 á Lágargarði og 2 á Boðanesheiminum, og tey 5 samdøgursrehabiliteringsplássini á Boðanesheiminum, til depilin. Hesi 9 stutttíðarplássini verða so løgd um til føst búpláss, ið tað eisini er tørvur á.

Umframt at fáa 9 nýggj føst bupláss, so ger hetta eisini, at allar røktardeildir í Heilsu- og umsorganartænastuni eru røktardeildir burturav. Hetta er meira skynsamt fyri deildirnar, sum í dag eisini fast hýsa umlætting og samdøgursrehabilitering, tí tað viðførir størri stabilitet og frið við sær.

Við at byggja 30 pláss verður mett møguligt eisini at endurnýggja tey sjey plássini á Umlættingarheiminum í V.U. Hammershaimbsgøtu, tvs. niðurleggja virksemið har. Fysisku

karmarnir hava leingi verið ótíðarhóskandi og illa egnaðir til røktartørvandi og demenssjúk fólk, og rakstrarliga er talan um lítla og tí lutfalsliga kostnaðarmikla eind.

Við hesi loysnini verða sostatt: 7 umlættingarpláss endurnýggjað, 9 pláss umløgd til føst búpláss, tá umlættingin flytur í umlættingar- og rehabiliteringsdepilin, og 14 nýggj stutttíðarpláss fingin til vega aftrat teimum, sum eru í dag.

Við deplinum økist dekningsstigið, t.e. lutfallið av búplássum í mun til talið av fólki eldri enn 80 ár, bæði á føstum røktarbúplássum og á stutttíðarbúplássum, sí kolonnu fyri árið 2018 í talvuni niðanfyri, har ætlanin við 8 nýggjum umlættingarplássum til demenssjúk á Tjarnargarði (j.nr. 17/02942) eisini sæst í kolonnu fyri ár 2020.

Verkætlanartilgongd:
Ætlanin er, at depilin skal vera í rakstri seinnu hálvu av 2018. Farast skal tí beinanvegin undir at gera nærri tørvs- og kravlýsing umframt skitsuuppskot sum grundarlag fyri útbjóðingartilfari, tíðarætlan, kostnaðarmeting og uppskoti til útbjóðingarhátt at leggja fyri eldranevndina í seinasta lagi til nevndarfundin 27. november 2017.

Staðseting og lendið kann hava ávísan týdning fyri bygningsloysn, og tí eigur at verða biðið um staðseting og grundøkið beinanvegin.

Til fyrireikingar, útvegan av skitsuuppskoti v.m. verður mett neyðugt við upphædd kr. 500.000 at játta av tøkum íløgukarmi 2775 eldrarøkt og stovna verkætlanarkontu til endamálið.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og heilsu- og umsorganarstjórin mæla til at byggja nýggjan umlættingar- og samdøgursrehabiliteringsdepil við 30 plássum at standa klárt at taka í nýtslu í seinnu hálvu av 2018, og í hesum sambandi:

- at gera tørvs- og kravlýsing og skitsuuppskot sum grundarlag fyri útbjóðingartilfari, tíðarætlan, konstnaðarmeting og uppskoti til útbjóðingarhátt at leggja fyri nevndina aftur til nevndarfundin 27. november 2017,

- at heita á byggi- og býarskipanarnevndina um staðseting, og

- at játta kr. 500.000 til fyrireikingar, útvegan av skitsuuppskoti v.m. av íløgukontu 2775 eldarøkt og stovna verkætlanarkontu til endamálið.

**Eldranevndin 02. oktober 2017**: Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 18. oktober 2017:** Samtykt at taka undir við eldranevndini og beina málið í býráðið.

Heðin Mortensen luttók ikki í viðgerðini av málinum.

**Býráðsfundur 26. oktober 2017:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Í sambandi við verkætlanina at byggja ein nýggjan umlættingar- og rehabiliteringsdepil hevur býarskipanardeildin arbeitt við møguligum staðsetingum til verkætlanina. Í mun til býarplanleggingina og staðseting av almennum stovnum vísir umsitingin á eitt økið við endan av Rólantsgøtu í Hoyvík, ið liggur náttúruvakurt upp at dalinum Langa, sí kortskjalið *Rólantsgøta_kort.*

Økið er partur av matrikklunum 135fe og 138a, ogn hjá Tórshavnar kommunu, sum eru væl størri, enn hvat tørvur er á, og skal ein depil til fólk byggjast, má hóskandi øki til tess frámatrikulerast. Byggingin skal somuleiðis skipast í mun til ein byggilinju, ið skal tryggja, at byggingin leggur seg eftir bygda umhvørvinum, og at ein hóskandi frástøða til verandi gøtu og frílendi verður hildin.

Økið liggur í A3 øki í almennu byggisamtyktini fyri Tórshavnar kommunu, og er økið ætlað blandaðari bústaða- og miðstaðabygging, har loyvt er at hava handlar, smáhandverk og minni virkir, skrivstovur, stovnar, samkomuhús, heilsubótarhøli og tílíkt. Soleiðis er ein umlættingar- og rehabiliteringsdepil ikki í stríð við almennu byggisamtyktina. Men í sambandi við útstykkingar í A3 øki skal serstøk byggisamtykt gerast.

Byggitørvurin á deplinum er áleið 2000$m^2$. Mest loyvda byggistig í A3 øki er 0,3, og er sostatt tørvur á einum grundstykki áleið 6000-6500$m^2$ til støddar. Talan er um bygging í einari hædd við 30 kømrum við bað og duri, venjingarhøli, uppihaldsøki við serveringskøki, vaskarí, goymslur.

Ein bústaður til umlætting hóskar seg væl í einum øki, sum longu er merkt av at vera bústaðarøki. Fríøki er nærmasti granni til ætlaðu byggingina, og stuðlar tað væl undir virksemið, at fólk búgva til umlætting í eitt styttri tíðarskeið.

Sama økið var einaferð ætlað til dagstovn í Hoyvík, men er hetta ikki aktuelt longur.

**Skjøl:**
Økið við Rólantsgøtu, journal nr. 17/03195-5
Rólantsgøta_kort, journal nr. 17/03195-6

**Tilmæli:**
Virkandi tekniski stjórin og virkandi býararkitekturin mæla til at samtykkja nevndu staðsetingina til ein nýggjan umlættingar- og rehabiliteringsdepil, at sundurbýta uml. 6500$m^2$ av matr.135fe og 138a, at gera nýggja serstaka byggisamtykt og at beina málið í eldranevndina, fíggjarnevndina og býráðið.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 07. mars 2018:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Ískoyti:**
Víst verður til samtyktina omanfyri.

**Tilmæli:**
Heilsu- og umsorganarstjórin mælir til at eldranevndin tekur undir við staðsetingini sum er ávíst og sum er samtykt av byggi- og býarskipanarnevndini, og at beina málið víðari í fíggjarnevndina og býráðið.

**Eldranevndin 09. apríl 2018:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 18. apríl 2018:** Samtykti at taka undir við Eldranevndini og senda málið til kunningar/viðmerkingar hjá eigarafelagnum og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 24. apríl 2018:** Atkvøtt varð um uppskot frá Tróndi Sigursson um at beina málið aftur í nevnd.

Einmælt samtykt at beina málið aftur í fíggjarnevndina.

**Ískoyti:**
<u>Tørvslýsing</u>

Til tess at gera tørvslýsingina, ið er grundarlag fyri ítøkiligari byggiskrá, so kvalifiseraða sum gjørligt, er valt at taka brúkaraumboð við servitan innan allar funktiónir við í arbeiðið. Hesi eru ein ergoterapetur, ein fysioterapeutur, ein køksleiðari og deildarleiðarin fyri verandi rehabilitering/umlætting. Harafturat hevur ein eindarleiðari verið við til tess at tryggja skynsemi í rakstri, tá bygningurin er liðugur og tikin í nýtslu.

Í stuttum verður mælt til 28 pláss býtt í tvær lonir. Við støði í hesum er gjørd meting um starsvfólkanormering og rúmskrá, umframt onnur yvirskipað viðurskifti. Talan verður eftir hesum um bygning uml. 1.800 fermetrar.

Sí tørvslýsing í hjalagda skjalið.

Í ætlan liggur at byggja depilin við Rólantsgøtu í Hoyvík. Hoyring hevur verið hjá eigarafelagnum, og er ynskið borið fram um, at bygningurin skal vera í einari hædd og hava flagtekju.

Brúkaraumboð hava serliga lagt dent á at køkur eigur at verða partur av umlættingar og rehabiliteringsdeplinum. Tí umframt tað heimliga og hugnaliga við at matur verður gjørdur á staðnum, so er kostur ein sera týðandi partur av rehabiliteringini og skal tillagast til einstaka borgarar.
Lágargarður er við at vera á markinum fyri hvussu nógvar døgurðar afturat køkurin megnar at gera afturat tí sum verður gjørt í dag.

Bygginevndin hevur góðkent tørvlýsingina, og klárt er tí at fara undir at gera byggiskrá, tíðarætlan og kostnaðarætlan.

Mett verður skilagott, at eldranevndin eisini umrøður tørvslýsinga til tess at tryggja felags fatan um verkætlanina.

**Tilmæli:**
Heilsu- og umsorganarstjórin og verkætlanarleiðarin mæla eldranevndini til, at taka undir við tørvslýsingini sum grundarlag fyri víðari arbeiðinum at gera byggiskrá v.m.

**Eldranevndin 04. juni 2018:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Ískoyti**:
Eigarafelagið hevur í hoyringssvari gjørt vart við, at um kommununa velur at brúka økið í Rólantsgøtu til annað enn barnagarð, hevur eigarafelagi rætt til endurgjald.

Umsitingin hevur kannað hetta hjá løgfrøðinginum, sum arbeiddi við avtaluni við eigarafelagið og løgfrøðiliga niðurstøðan er henda:

Kommunan hevur luttikið í útstykkingararbeiðinum og hevur tá goldið fyri 2.500 m2 . Ætlanin var at byggja barnagarð á øki.

Løgfrøðiliga metingin er, at kommunan hevur goldið fyri hetta øki og tí ikki eigur at gjalda einaferð afturat, um kommunan velur at byggja annað enn barnagarð á øki. Um kommunan ætlar at brúka meira enn 2.500 fermetrar, eigur kommunan at gjalda eigarafelagnum fyri tað, sum fer upp um 2.500 fermetrar. Tann kostnaðurin má avtalast nærri við eigarafelagið.

Tann løgfrøðiliga metingin er, at um kommunan ikki fer upp um teir 2.500 fermetrarnar, eigur kommunan ikki at gjalda eigarafelagnum nakað, tí goldið er longu fyri 2.500 fermetrar.

Enn er ikki greitt hvussu stórur ein umlættingar/rehabiliteringsdepil verður og tí er ilt at siga um kommuna hevur tørv á meira enn 2.500 fermetrum. Heldur ikki ber í løtuni til at siga hvat ein evt. kostnaður vildi verið um tørvur er á meira enn 2.500 fermetrum

**Tilmæli:**
Heilsu- og umsorganarstjórin og virkandi leiðari á stjórnarskrivstovuni mæla til at Fíggjarnevndin gevur umsitingini heimild at samráðast við eigarafelagi um evt. kostnað um kommunan hevur tørv á lendi sum er størri enn 2.500 fermetrar.

**Fíggjarnevndin 13. juni 2018:** Samtykt at taka undir við staðsetingini og at heimila umsitingini at samráðast við eigarafelagið um evt. kostnað um lendi størri enn 2.500 fermetrar. Málið beint í býráðið.

**Býráðsfundur 20. juni 2018:** Samtykt við 8 atkvøðum fyri, tveimum ímóti og trimum blonkum atkvøðum.

Fyri atkvøddu: Annika Olsen, Gunvør Balle, Marin Katrina Frýdal, Jákup Dam, Turið Horn, Bogi Andreasen, Ruth Vang og Halla Samuelsen.

Ímóti atkvøddu: Bjørg Dam og Tróndur Sigurðsson.

Blankt atkvøddu: Bjørghild Djurhuus, Helena Dam á Neystabø og Anfinn Brekkstein.

**Ìskoyti:**
Bygginevndin hevur á fundi 05.09.18 samtykt at bjóða Umlættingar- og rehabiliteringsdepilin út sum totalentreprisa ætlandi til tríggjar arbeiðstakarar. Tá bjóðað verður út sum totalentreprisa er vanligt, at tey, sum ikki fáa projektið, verða samsýnt fyri teirra uppskot. Til hetta endamál metir tekniska fyrisiting, at tørvur er á 300.000 kr.

Harumframt er tørvur á at gera lendiskanningar av staðsetingini, áðrenn útbjóðingartilfarið kann gerast liðugt. Til hetta krevst 100.000 kr.

**Tilmæli:**
Heilsu- og umsorganarstjórin og leiðarin á verkætlanardeildini mæla eldranevndini til at játta 400.000 kr. til 2775 Eldrarøkt (íløgur) L 27011 Nýggjur umlættingar- og rehabiliteringsdepil av 2775 Eldrarøkt (íløgur) L00001 Løgukarmur fyri árið og leggja málið fyri býráðið um fíggjarnevndina.

**Eldranevndin 10. september 2018:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 19. september 2018:** Samtykt at taka undir við eldranevndini og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 27. september 2018:** Samtykt við 11 atkvøðum fyri, ongari ímóti og einari blankari.

Fyri atkvøddu: Annika Olsen, Gunvør Balle, Marin Katrina Frýdal, Jákup Dam, Turid Horn, Bogi Andreasen, Bergun Kass, Heðin Mortensen, Bjørghild Djurhuus, Bjørg Dam og Odd Færø.

Blankt atkvøddi: Annfinn Brekkstein.

**Ískoyti:**
Byggiskráin/útbjóðingartilfarið er í gerð til umlættingar- og rehabiliteringsdepilin. Mett er um heildarkostnað fyri verkætlanina. Sí kostnaðarmeting j. nr 18/03889 Ætlanin er at bjóða verkætlanina út í heildararbeiðsstøku í desember 2018. Tilboðini skulu verða TK í hendi í februar 2019. Mett byggitíð er 18 mánaðir. Arbeiðið at byggja umlættingar- og rehabiliteringsdepilin byrjar eftir ætlan í apríl 2019 og avhending í oktober 2020.

Verkætlanin verður boðin út í heildararbeiðstøku til 3 arbeiðstakarar:

Sp/f Húsavarðartænastuna,
P/F Articon
P/F MT Højgaard.

**Tryggingarviðurskifti:**
Teknað verður all-risk trygging, men ivasamt er um tað ber til at tekna verkætlanarábyrgdartrygging í heildararbeiðstøku sambært tryggingarráðgeva hjá TK.

**Tilmæli:**
Heilsu- og umsorganarstjórin, Verkætlanardeildarleiðarin og tekniski stjóri mæla til, at umsitingin arbeiðir eftir omanfyristandandi leisti og fær heimild til at fara í sáttmálasamráðingar við vinnandi arbeiðstakara við møguligum tillagingum. Mælt verður somuleiðis til at samtykkja kostnaðarmetingina, sí j. nr. 18/03889. Vísir tað seg, at ein arbeiðstakari meldar frá, verður mælt til, at umsitingin bjóðar nýggjum arbeiðstakara við at veita tilboð. Málið verður lagt fyri aftur eldranevnd, fíggjarnevnd og býráðið til støðutakan eftir sáttmálasamráðingarnar.

**Eldranevndin 05. november 2018:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

Nevndin ynskir at elementir ella modulir kunnu verða positivt nevnd í útbjóðingini sum ein møguleiki, umframt at tilboðsveitarar kunnu koma við einum alternativum uppskoti.

**Ískoyti:**
Sambært ásetingunum fyri A3 øki í 3. grundumráði í almennu byggisamtyktini skal serstøk byggisamtykt gerast fyri nýggjar útstykkingar. Ásetingarnar fyri útstykkingina við Rólantsgøtu í Hoyvík, sum fevnir um grundstykkir á 300 $m^2$, eru ásettar í skeytið fyri hvørt grundstykkið, og tískil er ongin serstøk byggisamtykt fyri økið. Nýggi umlættingar- og rehabiliteringsdepilin er partur av hesi útstykkingini, tískil verður kunnað um, at ásetingarnar fyri nýggja stovnin somuleiðis verða ásettar í skeytið.

Økið, sum er samtykt til nýggjan umlættingar- og rehabiliteringsdepil, er partur av matriklunum 135fe og 138a, ogn hjá Tórshavnar kommunu, sum eru væl størri enn hvat tørvur er á. Eitt øki áleið 4900 $m^2$ skal tí sundurbýtast frá matr. 135fe, umframt at eitt øki áleið 1700 $m^2$ skal sundurbýtast frá matr. 138a til samanlegging við sundurbýtið frá 135fe. Nýggi matrikulin verður sostatt áleið 6.600 $m^2$ til støddar, sí uppskot til sundurbýtið og samanlegging á kortskjalinum *Rólantsgøta_marknaumskipan*.

**Skjøl:**
*Rólantsgøta_marknaumskipan*, journal nr. 17/03195-21.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin, býarverkfrøðingurin og býararkitekturin mæla til at sundurbýta eitt øki frá matr. 135fe og 138a at samanleggja til ein nýggjan matrikul áleið 6.600 $m^2$ til nýggjan umlættingar- og rehabiliteringsdepil, sum verður at senda til Umhvørvisstovuna til avgreiðslu, og at beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Tekniska nevnd 27. november 2018:** Ein meiriluti, Jákup Dam, Marin Katrina Frýdal og Bogi Andreasen, samtykti at taka undir við tilmælinum.

Tróndur Sigurðsson atkvøður ímóti og mælir til at stovnarnir, sum kommunan í framtíðini finnur staðseting til, verða staðsettir í nýggjum áhugaverdum umhvørvi í Stórutjørn í Hoyvík.

Annfinn Brekkstein atkvøður blankt.

**Fíggjarnevndin 28. november 2018:** Ein meiriluti, Annika Olsen, Gunvør Balle og Bergun Kass, taka undir við eldranevndini 5. november 2018 og meirilutanum í teknisku nevnd 27. november 2018 og beina málið í býráðið og málið um sundurbýtið í býráðið umvegis byggi- og býarskipanarnevndina.

Ein minniluti, Tróndur Sigurðsson atkvøður ímóti og mælir til, at stovnarnir, sum kommunan í framtíðini finnur staðseting til, verða staðsettir í nýggjum áhugaverdum umhvørvi í Stórutjørn í Hoyvík.

Ein minniluti, Annfinn Brekkstein, atkvøður blankt.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 28. november 2018:** Ein meiriluti, Marin Katrina Frýdal, Turið Horn og Bogi Andreasen, samtykti at taka undir við tilmælinum.

Ein minniluti, Tróndur Sigurðsson, atkvøður ímóti og mælir til at stovnarnir, sum kommunan í framtíðini finnur staðseting til, verða staðsettir í nýggjum áhugaverdum umhvørvi í Stórutjørn í Hoyvík.

**Býráðsfundur 29. november 2018:** Atkvøtt varð um tilmælið frá meirilutunum í fíggjarnevndini og byggi- og býarskipanarnevndini, ið varð samtykt við 10 atkvøðum fyri og 2 blonkum atkvøðum.

Fyri atkvøddu: Annika Olsen, Gunvør Balle, Marin Katrina Frýdal, Jákup Dam, Turið Horn, Bogi Andreasen, Bergun Kass, Bjøghild Djurhuus, Halla Samuelsen og Bjørg Dam

Blankt atkvøddu: Tróndur Sigurðsson og Annfinn Brekkstein.

**Eldranevndin 19. mars 2019:** Útsett.

**Ískoyti:**
Eftir at byggiskráin til umlættingar- og rehabiliteringsdepilin (URD) varð liðug, bleiv verkætlanin boðin út 6. desembur 2018, í heildararbeiðstøku til 3 heildararbeiðstakarar, tað er:

- Sp/f Húsavarðartænastan
- P/F Articon
- P/F MT Højgaard.

Tilboðini komu inn 7. marts 2019, og liggja í j.nr. 18/03889-3

Dómsnevnd, mannað við 7 fólkum við viðkomandi førleikum, hevur síðani neyvt gjøgnumgingið øll trý tilboðini og mett tey út frá útbjóðingartilfarinum. Eftir at tilboðini eru gjøgnumgingin og viðgjørd, hevur dómsnevndin gjørt dómsnevndarálit, sum er lagt fram fyri bygginevndina, sum tekur undir við úrslitinum.

Dómsnevndarálitið framgongur á j.nr. 18/03889-4

Um býráðið tekur undir við tilmælinum, er næsta stig, at kommunan fer undir sáttmálasamráðingar við vinnandi heildararbeiðstakara. Tá sáttmáli er gjørdur, skal heildararbeiðstakarin gera myndugleikaprojekt í tøttum samstarvi við kommununa og fáa til vega øll neyðug loyvir.

Út frá vinnandi uppskotinum hevur umsitingin gjørt eina samlaða kostnaðarmeting fyri verkætlanina, sum er íroknað HVÙ, prosjektumsiting, trygging o.a., sum sæst á j.nr. 18/03889-2.

Ætlanin er at hava framløgu fyri býráðslimunum mikudagin kl. 15.00, har øll uppskotini verða víst fram og har kunnað verður um dómsnevndararbeiðið.

**Tilmæli:**
Bygginevndin, heilsu- og umsorganarstjórin, verkætlanardeildarleiðarin og tekniski stjórin mæla til:
- at taka undir við dómsnevndarálitinum og fara undir sáttmálasamráðingar og gera sáttmála við vinnandi heildararbeiðstakara.

- at játta kr. 23 mió. í 2019 av tøkum løgukarmi konto 5775 L0001 løgukarmur fyri ári og L0002 framfluttar løgur og at játta restina av kostnaðinum sambært kostnaðarmeting j.nr. 18/03889-2 á fíggjarætlanini í 2020.

at leggja málið fyri býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Eldranevndin 27. mars 2019:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 28. mars 2019:** Ein meiriluti, Annika Olsen, Gunvør Balle, Bergun Kass og Halla Samuelsen, mælir býraðnum til at taka undir við dómsnevndarálitinum og heimila umsitingini at fara undir samráðingar við vinnandi heildararbeiðstakara. Málið verður at leggja fyri aftur fíggjarnevnd og býráð.

Ein minniluti, Tróndur Siguðsson, tekur undir við at gera ein umlættingardepil, men mælir til at staðseta umlættingardepilin við Stórubrekku saman við barnagarðinum, ið ætlanin er at staðseta har.

**Býráðsfundur 28. mars 2019:** Atkvøtt varð um tilmælið frá meirilutanum, ið varð samtykt við 8 atkvøðum fyri, ongari í móti og 5 blonkum.

Fyri atkvøddu: Annika Olsen, Gunvør Balle, Marin Katrina Frýdal, Jákup Dam, Turid Horn, Bogi Andreasen, Bergun Kass og Halla Samuelsen.

Blankt atkvøddi: Tróndur Sigurðsson, Odd Færø, Helena Dam á Neystabø, Bjørg Dam og Annfinn Brekkstein.

**Ískoyti:**
Tilfar kemur.

**Fíggjarnevndin 10. apríl 2019:** Tikið av skrá.

**Ískoyti:**
Umsitingin hevur verið í samráðingar við vinnandi heildararbeiðstakara, MT Højgaard Føroyar, til tess at finna sparingar á verkætlanina.

Út frá sparingum frá MT Højgaard Føroyar hevur umsitingin gjørt eina samlaða kostnaðarmeting fyri verkætlanina, sum er íroknað HVÙ, prosjektumsiting, trygging o.a., sum sæst á j.nr. 18/03889-9.

Um býráðið tekur undir við tilmælinum er næsta stig, at kommunan fer undir sáttmálasamráðingar við vinnandi heildararbeiðstakara. Tá sáttmáli er gjørdur, skal heildararbeiðstakarin gera myndugleikaprosjekt í tøttum samstarvi við kommununa og fáa til vega øll neyðug loyvir.

**Tilmæli:**
Heilsu- og umsorganarstjórin, verkætlanardeildarleiðarin og tekniski stjórin mæla til:
- at taka undir við dómsnevndarálitinum og fara undir sáttmálasamráðingar og gera sáttmála við MT Højgaard Føroyar.
- at játta kr. 23 mió. í 2019 av tøkum løgukarmi konto 5775 L0001 løgukarmur fyri ári og L0002 framfluttar løgur og at játta restina av kostnaðinum sambært

kostnaðarmeting j.nr. 18/03889-9 á fíggjarætlanini í 2020.

**Fíggjarnevndin 24. apríl 2019:** Ein meiriluti, Annika Olsen, Gunvør Balle og Bergun Kass taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið.

Ein minniluti, Tróndur Sigurðsson, atkvøður blankt.

**Býráðsfundur 24. apríl 2019:** Atkvøtt varð um tilmælið hjá meirilutanum í fíggjarnevndini, sum varð samtykt við sjey atkvøðum fyri, tveimum ímóti og tveimum blonkum atkvøðum.

Fyri atkvøddu: Annika Olsen, Gunvør Balle, Marin Katrina Frýdal, Jákup Dam, Turid Horn, Bogi Andreasen, Bergun Kass og Bjørghild Djurhuus.

Ímóti atkvøddu: Annfinn Brekkstein og Tróndur Sigurðsson.

Blankt atkvøddu: Helena Dam á Neystabø og Bjørg Dam.

# 91/19 Skipan av fyribils dagstovni í Hoydølum

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Mentamálanevndin | 24.04.2019 | 138/19 | 19/01676-1 |
| 2 Fíggjarnevndin | 24.04.2019 | 118/19 | 19/01676-1 |
| 3 Býráðsfundur | 24.04.2019 | 91/19 | 19/01676-1 |

**Upprunin til málið:**
Tørvur á fleiri dagstovnaplássum.

**Lýsing av málinum – samandráttur**
Kommunan hevur fingið allar neyðugar góðkenningar at skipa fyribils dagstovn í lonini í Hoydølum til árslok 2020 (mál 19/00224).

Í løtuni eru tríggjar vøggustovur í hølunum, sum eru tengdar at ávikavist Býlingshúsinum inni á Gøtu og Býlingshúsinum í Maritugøtu. Hesir stovnar verður í løtuni útbygdir, og so skjótt hesar útbyggingar eru lidnar, flyta børnini og starvsfólkini í teirra viðkomandi stovn væntandi í summarfrítíðini í seinasta lagi.

Skotið verður upp at skipa fyribils dagstovn í Hoydølum við egnum rakstrarstaði í fíggjarætlanini frá 1. august 2019 til 31. desember 2020 – ætlandi á kontu 3110, sum áður varð nýtt til Reiðrið, ið eisini var fyribils dagstovnur.

Ynskiligt er at fáa bjóðað pláss út í BARN skjótast eisini soleiðis, at til ber at lýsa eftir starvsfólki og manna stovnin.

Tey, sum fáa pláss í fyribils stovninum í Hoydølum, verða ikki knýtt til ávísan stovn, so sum skipanin hevur verið við omanfyri nevndu býlingshúsum. Heldur skulu foreldrini, sum fáa pláss í fyribils stovninum í Hoydølum, bókað sær nýtt stovnspláss at byrja í seinasta lagi 1. januar 2021.

Mett verður í fyrsta umfari skilagott at bjóða 36 vøggustovupláss (3 stovur) og 20 barnagarðspláss (1 stova) út BARN at byrja 1. august, tvs. 56 pláss. Til ber seinni at bjóða fleiri pláss út eftir tørvi og so hvørt starvsfólk og fígging er til tað.

Sum upplýst í øðrum máli (19/00945) er játtan ikki tøk í fíggjarætlanini til nýggju plássini, sum her verða útvegað. Kostnaður sambært fíggjarleistinum fyri hesi ávikavist 36 vøggustovuplássini og 20 barnagarðsplássini í 6 mánaðir er kr. 2.094.549. Neyðugt er við eykajáttan til endamálið.

**Lógir, ásetingar o.a.**
Dagstovnalógin.

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**
19/00224 Leigumál – Lonin í Hoydølum til fyribils dagstovn
19/00945 Eykajáttan til nýggj dagstovnapláss í 2019

**Møgulig frávik/lættar frá ásetingum**

**Umhvørvisárin**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl**

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** (set x)

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| Umsitingaravleiðingar | | | | |
| Umhvørvisavleiðingar | | | | |
| Sosialar avleiðingar | | | | |
| Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar | X | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** **Ja** ☒ **Nei** ☐

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin, fyrisitingarstjórin og leiðarin á barna- og ungdómsdeildini mæla til at skipa fyribils dagstovn í lonini í Hoydølum til í fyrsta umfari 36 vøggustovuplássum og 20 barnagarðsplássum frá 1. august 2019, og í hesum sambandi um at játta kr. 2,1 mió til kontu 3110 Lonin í Hoydølum av framfluttum avlopi konto 20910 Aðrar inntøkur. Málið verður beint í býráðið um fíggjarnevndina.

**Mentamálanevndin 24. apríl 2019:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið til tvær viðgerðir í býráðið um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 24. apríl 2019:** Samtykt at taka undir við mentamálanevndini og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 24. apríl 2019:** Einmælt samtykt.

# 92/19 Gøtunavn til innkoyringarveg frá Glyvursvegi til "Undir Kongavarða" og "Við Klingurstjørn"

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Gøtunavnanevndin | 30.10.2017 | 6/17 | 17/03498-2 |
| 2 Gøtunavnanevndin | 26.02.2018 | 1/18 | 17/03498-2 |
| 3 Gøtunavnanevndin | 30.04.2018 | 2/18 | 17/03498-2 |
| 4 Mentamálanevndin | 14.05.2018 | 175/18 | 17/03498-2 |
| 5 Býráðsfundur | 24.05.2018 | 124/18 | 17/03498-2 |
| 6 Mentamálanevndin | 06.06.2018 | 202/18 | 17/03498-2 |
| 7 Gøtunavnanevndin | 23.10.2018 | 5/18 | 17/03498-2 |
| 8 Mentamálanevndin | 07.11.2018 | 336/18 | 17/03498-2 |
| 9 Býráðsfundur | 31.01.2019 | 16/19 | 17/03498-2 |
| 10 Mentamálanevndin | 13.02.2019 | 63/19 | 17/03498-2 |
| 11 Gøtunavnanevndin | 19.03.2019 | 1/19 | 17/03498-2 |
| 12 Mentamálanevndin | 03.04.2019 | 112/19 | 17/03498-2 |
| 13 Býráðsfundur | 24.04.2019 | 92/19 | 17/03498-2 |

**Lýsing av málinum – samandráttur:**

Umhvørvisstovan hevur sent áheitan til Teknisku deild hjá Tórshavnar kommunu um at broyta gøtunavnið "Undir Kongavarða" soleiðis, at teinurin frá Glyvursvegi til "Undir Klingrutjørn" og víðari fær sítt egna navn. Vegurin er vístur við reyðum á hjáløgdu mynd.

**Gøtunavnanevndin 30. oktober 2017:** Málið varð umrøtt og verður viðgjørt aftur á næsta fundi.

**Ískoyti:**
Sambært skrivi frá teknisku deild 20.02.2018 er í fyrsta umfari neyðugt at fáa eitt nýtt navn til innkoyringarvegin frá Glyvursvegi og niðan til nýggja býlingin "Við Klingrutjørn". Samstundis verður sagt frá, at Umhvørvisstovan viðmælir, at nýggja útstykkingin í framhaldi av vegnum fær sama veganavn.

**Gøtunavnanevndin 26. februar 2018:** Nevndin ynskir ein ástaðarfund og meira kunning um, um fleiri útstykkingar verða frá sama vegi og hvørjar ætlanir eru á økinum yvirhøvur.

**Ískoyti:**
Fundurin 30.04.2018 byrjar við ástaðarfundi, har nevndin fær kunning frá staðkendum argjamanni og einum starvsfólki á tekniska økinum hjá kommununi.

**Gøtunavnanevndin 30. apríl 2018:** Nevndin mælir til, at vegurin frá Glyvursvegi til endan á nýggju útstykkingini eisini fær navnið «Við Klingrutjørn».

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla til at taka undir við tilmælinum frá gøtunavnanevndini og beina málið í býráðið.

**Mentamálanevndin 14. mai 2018:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 24. mai 2018:** Atkvøtt varð um uppskot frá Marin Katrinu Frýdal um at beina málið aftur í mentamálanevndina, ið varð einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Sambært almenna staðarnavnamyndugleikanum er navnið á tjørnini, ið vegurin er uppkallaður eftir, Klingrutjørn. Mest hóskandi er, at vegarnavið og tjarnarnavnið hava sama málsliga framburð. Skal hetta ikki vera so, er skilabest at heita á Staðarnavnanevnd landsins um at broyta tjarnarnavnið fyrst.

**Mentamálanevndin 06. juni 2018:** Samtykt at heita á Staðarnevnanevnd landsins um at taka málið upp til nýggja viðgerð.

**Ískoyti:**
Eftir áheitan frá teknisku fyrisiting verður málið tikið upp til nýggja viðgerð. Málið snýr seg um at seta navn á innkoyringarvegin frá Glyvursvegi niðan til og við nýggju útstykkingina, sum er í gerð. Umhvørvisstovan og tekniska fyrisiting hjá kommununi mæla til, at innkoyringarvegurin frá Glyvursvegi og seinna útstykkingin fáa sama navn, t.v.s. at *Undir Kongavarða* og *Við Klingrutjørn/Klingurstjørn* verða síðuvegir til hendan vegin.

Spurningurin um navnið Klingrutjørn ella Klingurstjørn til fyrru útstykkingina verður viðgjørdur í máli 16/03091.

**Gøtunavnanevndin 23. oktober 2018:** Nevndin mælir til navnið Andrasarbreyt, eftir niðursetumanninum Andras Mortanssyni.

Skotið verður upp at undirskelti verður sett upp við fulla navni Andrasar og øðrum upplýsingum.

**Ískoyti:**
Eitt kort við heitinum "*Kort - nýtt veganavn á Argjum*" er hjálagt. Tað vísir vegin, sum talan er um, við reyðari striku.

**Tilmæli:**
Ávísur vandi kann vera fyri blandi við Andrasargøtu í Hoyvík og kundi tí eisini verið umhugsað at kalla vegin fyri ‘Andrass Mortanssonar breyt’.

Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til at taka støðu til tilmælini.

**Mentamálanevndin 07. november 2018:** Samtykt at kalla vegin «Andrass Mortanssonar breyt» og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 31. januar 2019:** Fyrst varð atkvøtt um uppskot um at beina málið aftur í mentamálanevndina, ið varð samtykt við 11 atkvøðum fyri og tveimum atkvøðum ímóti.

Fyri atkvøddu: Marin Katrina Frýdal, Jákup Dam, Turid Horn, Sjúrður Olsen, Bergun Kass, Tróndur Sigurðsson, Bjørghild Djurhuus, Helena Dam á Neystabø, Bjørg Dam, Halla Samuelsen og Annfinn Brekkstein.

Ímóti atkvøddu: Annika Olsen og Gunvør Balle.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla til at beina málið aftur í gøtunavnanevndina.

**Mentamálanevndin 13. februar 2019:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Gøtunavnanevndin 19. mars 2019:** Nevndin hevur tvey uppskot:

1. At vegurin frá Glyvursvegi til endan á nýggju útstykkingini eisini fær navnið «Við Klingurstjørn» - talmerking við týðiligari skelting ella

2. «Andrass Mortanssonar gøta».

**Mentamálanevndin 03. apríl 2019:** Samtykt at taka undir við uppskoti 1 og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 24. apríl 2019:** Einmælt samtykt.

# 93/19 Avtala við Ítróttasamband Føroya um ÍSF-húsið vm.

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Mentamálanevndin | 15.06.2016 | 176/16 | 16/01715-2 |
| 2 Mentamálanevndin | 17.10.2016 | 266/16 | 16/01715-2 |
| 3 Fíggjarnevndin | 07.12.2016 | 405/16 | 16/01715-2 |
| 4 Mentamálanevndin | 02.11.2016 | 281/16 | 16/01715-2 |
| 5 Mentamálanevndin | 30.11.2016 | 309/16 | 16/01715-2 |
| 6 Fíggjarnevndin | 22.02.2017 | 29/17 | 16/01715-2 |
| 7 Mentamálanevndin | 15.03.2017 | 46/17 | 16/01715-2 |
| 8 Býráðsfundur | 20.06.2017 | 169/17 | 16/01715-2 |
| 9 Mentamálanevndin | 13.09.2017 | 206/17 | 16/01715-2 |
| 10 Mentamálanevndin | 04.10.2017 | 236/17 | 16/01715-2 |
| 11 Mentamálanevndin | 08.11.2017 | 276/17 | 16/01715-2 |
| 12 Mentamálanevndin | 29.11.2017 | 311/17 | 16/01715-2 |
| 13 Mentamálanevndin | 07.03.2018 | 83/18 | 16/01715-2 |
| 14 Mentamálanevndin | 06.06.2018 | 189/18 | 16/01715-2 |
| 15 Byggi- og býarskipanarnevndin | 15.08.2018 | 176/18 | 16/01715-2 |
| 16 Mentamálanevndin | 12.09.2018 | 264/18 | 16/01715-2 |
| 17 Mentamálanevndin | 03.10.2018 | 296/18 | 16/01715-2 |
| 18 Mentamálanevndin | 28.11.2018 | 348/18 | 16/01715-2 |
| 19 Mentamálanevndin | 10.12.2018 | 378/18 | 16/01715-2 |
| 20 Fíggjarnevndin | 13.12.2018 | 372/18 | 16/01715-2 |
| 21 Býráðsfundur | 13.12.2018 | 315/18 | 16/01715-2 |
| 22 Fíggjarnevndin | 10.04.2019 | 107/19 | 16/01715-2 |
| 23 Fíggjarnevndin | 24.04.2019 | 119/19 | 16/01715-2 |
| 24 Býráðsfundur | 24.04.2019 | 93/19 | 16/01715-2 |

**Málslýsing:**
Sum liður í framtíðar gerð av langhyli (50 m.) (sí mál 15/01400 – Serstøk nevnd at fyrireika nýggjan svimjihyl) við síðuna av Svimjihøllini í Gundadali, hevur umsitingin innleiðandi havt dialog við Ítróttasamband Føroya (ÍSF) um møguliga niðurtøku av ÍSF-húsinum, ið stendur á kommunalum lendi matr. 1268 í Gundadali. Leiguavtalan er frá 1975 (sí hjálagt fylgiskjal 1 á nevndarportalinum).

Gjørt er uppskot til keypsavtalu (sí hjálagt fylgiskjal 2 á nevndarportalinum). Tó viðv. keypsupphædd ella endurgjald fyri niðurtøkuna hevur ikki verið nøkur realitetsviðgerð. Fyri at fáa ásett eina upphædd eru tvinnir møguleikar. Hin fyrri at samráðast til eina semju og hin seinni er sbrt. ásetingum í leiguavtaluni at biðja Sorinskrivarin um at tilnevna tveir metingarmenn sum so áseta eina bindandi upphædd.

Harumframt er gjørt uppskot til ætlanarskriv um staðseting av framtíðar ÍSF-húsi (sí hjálagt fylgiskjal 3 á nevndarportalinum). Her er nevnt viðv. møguleika fyri at byggja nýtt høvuðssæti omaná Fimi í Gundadali, sbrt. nærri treytum um byggistig, byggisnið, gjald fyri íbindingar vm. Hesin rættur skal vera galdandi í ávíst áramál.

**Tilmæli:**

Trivnaðarstjórin, løgdeildarleiðarin og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til at umrøða spurningin um framtíðar staðseting í Gundadali og at heimila umsitingini at fara undir samráðingar um endurgjaldsupphædd antin við samráðingum ella metingarmonnum.

**Mentamálanevndin 15. juni 2016:** Samtykt at taka undir við tilmælinum um samráðing.

**Ískoyti**
Umsitingin hevur samráðst við ÍSF og er nú komið ásamt um eina keypsavtalu og ætlan um leigu av byggigrund omaná Fimi innan nærri ásett áramál. Alt hetta treytað av at undirtøka var fyri hesum í nevndum og býráðnum og á aðalfundi hjá ÍSF.

Hjálagt eru dagført skjøl við støði í fundinum og teirri semju viðv. endurgjaldi fyri ÍSF-húsini.

Keypið skal fíggjast á løgukarminum fyri 2018.

**Tilmæli**
Trivnaðarstjórin, mentamálaleiðarin og løgdeildarleiðarin mæla mentamálanevndini til at samtykkja uppskot til keypsavtalu og uppskot til ætlanarskriv um leigu av byggigrund omaná Fimi og beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Mentamálanevndin 17. oktober 2016:** Útsett.

**Mentamálanevndin 02. november 2016:** Útsett.

**Mentamálanevndin 30. november 2016:** Ein meiriluti, Tróndur Sigurðsson og Sigrún Mohr, tekur undir við at gera keypsavtalu fyri í mesta lagi kr. 4 mió, men tekur ikki undir við at leiga ÍSF byggigrund omaná Fimi.

Ein minniluti, Jógvan Arge, mælir til, at málið verður lagt fyri nýggja býráðið til støðutakan.

Helena Dam á Neystabø var ikki við í viðgerðini.

**Fíggjarnevndin 07. december 2016:** Tikið av skrá.

**Fíggjarnevndin 22. februar 2017:** Samtykt at beina málið í mentamálanevndina.

**Ískoyti**
Nú er nakað fráligið síðani samráðingarnar við ÍSF. Mett verður hóskandi at fara undir eina nýggja tilgongd og har kanna nærri um aðrar staðsetingar eru møguligar umframt bygging omaná Fimi.

**Tilmæli**

Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til at heimila umsitingini at fara undir nýggjar samráðingar við ÍSF við atliti til keypsupphædd o.a. fyri verandi ÍSF-hús og møguligar framtíðar staðsetingar av virkseminum hjá ÍSF.

**Mentamálanevndin 15. mars 2017:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Býráðsfundur 20. juni 2017:** Tikið av skrá.

**Ískoyti**
Býarskipanardeildin/tekniska fyrisiting hevur gjørt eina sonevnda volumenkanning viðv. í hvønn mun eitt møguligt ÍSF-hús yvirskipað kann rúmast á ymiskum støðum í Gundadali. Dømini eru at síggja í hjáløgdu fílu.

Á fundinum kemur umsitingin at greiða frá uppskotunum. Ætlandi halda samráðingarnar við ÍSF fram í september og ætlandi kann ein loysn leggjast til støðutakan í oktober.

**Tilmæli**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðari mæla mentamálanevndini til at umrøða uppskotini við atliti til at umsitingin heldur fram við samráðingunum við ÍSF.

**Mentamálanevndin 13. september 2017:** Útsett.

**Mentamálanevndin 04. oktober 2017:** Umrøtt.

Halla Samuelsen ynskir at ÍSF verður boðið á fund við mentamálanevndina at greiða frá sínu støðu.

Heðin Mortensen var ikki við í viðgerðini av hesum málið.

**Ískoyti 8. november 2017**
Greitt verður frá fyribils status í samráðingunum og fráboðan frá ÍSF um, hvørji støð tey nú ynskja at realitetsforhandla um.

**Tilmæli**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til at umrøða málið við atliti til at umsitingin heldur fram við samráðingunum.

**Mentamálanevndin 08. november 2017:** Útsett.

**Mentamálanevndin 29. november 2017:** Ein meiriluti, Gunvør Balle, Turið Horn og Marin Katrina Frýdal, mælir til at arbeiða víðari við eini loysn frá vestara skýli oman móti niðara vølli sum fyrsta val.

Halla Samuelsen ynskir at ÍSF verður boðið á fund við mentamálanevndina at greiða frá sínu støðu.

**Ískoyti**
Fyri at kunna lýsa eini loysn frá vestara skýli oman móti niðara vølli er neyðugt at gera eitt sonevnt volumenstudie, har kannað verður um økið rúmar einum nærri hugsaðum bygningi. Býarskipanardeildin hevur ikki orku til at gera arbeiðið í løtuni. Fyri at koma víðari er hugsanin at biðja uttanhýsis ráðgeva um at gera arbeiðið. Er mett til ca. 2 dagar. Ætlanin er

at at fáa uttanhýsis ráðgeva at gera kanningina og at tað verður fíggjað 50%/50% millum kommununa og ÍSF. Útreiðslurnar hjá kommununi vera fíggjaðar av konto 5365 Stuðul til ítrótt.

**Tilmæli**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til at taka kunningina til eftirtektar.

**Mentamálanevndin 07. mars 2018:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Ískoyti:**
Í mun til tilmæli seinast er tann broyting, at ÍSF sjálvt átók sær at gera eitt uppskot saman við ráðgeva sínum Sp/f MAP ark. Sí hjálagt uppskot frá ÍSF. ÍSF hevur í hyggju innleiðandi at umrøða uppskotið við HB og B36, ið eru tveir høvuðsáhugapartar í mun til ovara vøll og skýlið.

Eftir umrøðuna í mentamálanevndini verður spurningurin um staðseting við ovaravøll í Gundadali beindur til viðgerðar í Bygg- og býarskipanarnevndini. Hareftir verða møguligar samráðingar við ÍSF tiknar uppaftur.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til at umrøða uppskotið og at samtykkja at beina spurningin um staðsetingna til viðgerðar í Byggi- og býarskipanarnevndini.

**Mentamálanevndin 06. juni 2018:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og at beina málið í teknisku nevnd eisini.

**Ískoyti:**
Ítróttarøkið í Gundadali er karmur um fleiri ítróttargreinar og aktivt virksemi, sum støðugt veksur, og ynskini um betri umstøður, ábøtur ella nýggjar funktiónir vaksa somuleiðis alsamt meira. Plásstrot er í Gundadali, men fleiri møguleikar eru at víðka um virksemi, anlegg og útbyggingar/nýbyggingar.

Tá talan er um nógv ymiskt virksemi og bygging innan eitt avmarkað øki, so er neyðugt at hyggja at, hvørjir møguleikar eru at sameina nýbygging við verandi bygging, soleiðis at meira lendi ikki verður tikið til nýbyggingar. Gott er at hava «luft» rundan um og ímillum ymsu bygningarnar, hetta m.a. til gøtusamband, parkering og fríøki.

Nógvar ábøtur eru gjørdar í Gundadali, men enn eru nakrir bygningar, ið kundu verið umvældir. M.a. er tað skýlið á vestursíðuni við ovara vøll, sum í dag er ein baksíða út ímóti býnum. Skýlið er eyðkent við eini langari einsháttaðari framsíðu upp at einum óskipaðum parkeringsplássi. So heldur enn at spjaða meiri bygging í økinum, er eyðsýnt at staðseta og flætta saman nýtt ÍSF við verandi skýlið, soleiðis at alt økið verður skipað og fríðkað um. Hetta er ein leistur, ið átti at verið nýttur í sambandi við framtíðar víðkanir og ábøtur í Gundadali, tí fleiri møguleikar eru at gagnnýta pláss, har tað samstundis verður betra um verandi øki.

Ítróttasamband Føroya er somuleiðis høvuðssætið fyri alla ítróttina, tískil er staðsetingin og nógva plássið í økinum væl egnað til ein miðdepil, sum ÍSF er. Verandi atkoma til økið gerst samstundis til eina greiða høvuðsinngongd til Gundadal, umframt at ÍSF fær útsýnið út yvir alt ítróttarøkið - og ítróttina.

Nýggja staðsetingin er partur av ítróttaøkinum í Gundadali, og er tí fevnt av umráðispartinum D2 í Almennu byggisamtyktini fyri Tórshavnar kommunu, har ásetingarnar eru:

> *3. Umráðispartarturin D2 verður kannaður ítrótti og øðrum, sum eftir eini heildarætlan fyri alt økið ella ein part av økinum kann virka saman við ítróttinum.*

**Tilmæli:**
Virkandi tekniski stjórin og virkandi býararkitekturin mæla til at taka undir við staðsetingina til nýtt ÍSF hús, og at beina málið aftur í mentamálanevndina.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 15. august 2018:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Ískoyti**:
Umsitingin hevur verið í samráðingum við ÍSF um málið. Grundarlag tykist nú vera fyri semju við ÍSF um málið, herundir endurgjald fyri ÍSF-húsið og nær húsið verður tikið niður, umframt prinsipsemja um staðseting av nýggjum húsi og treytirnar fyri tí.

Sí hjálagt uppskot til avtalur við ÍSF, ið nú skulu til endaligt samráðingarumfar.

Keypsvtalan inniber at TK skal rinda ÍSF 5.000 tkr. fyri ÍSF-húsið. Í sambandi við fíggjarætlanararbeiðið fyri 2019 ella 2020 skal henda upphædd setast av á fíggjarætlanini.

Avtalan um nýggju staðsetingina vil innibera at TK skal fíggja ávísar útreiðslur í sambindingini millum nýggja ÍSF-húsið og Ovara skýlið. Hesar vera neyvari mettar í sambandi við at ÍSF og tess ráðgevi gera disposiónsuppskot. Harumframt ynskir ÍSF at TK avklárar jarðfrøðiliga váðan í sambandi við bygging á økinum ella kompenserar fyri tað. Umsitingin er í holt við at kanna hetta og fyriliggur ein avkláring ætlandi innan 2 vikur. Sostatt eru útlit fyri endaligari semju við ÍSF innan fáar vikur. Fundur er í umboðstinginum hjá ÌSF 9. okt. og er ætlan at tá skal endalig semja fyriliggja.

**Tilmæli**:
Trivnaðarstjórin, leiðarin á Stjórnarskrivstovuni og mentamálaleiðarin kunna um gongdina í samráðingunum.

**Mentamálanevndin 12. september 2018:** Kunnað varð um málið.

**Ískoyti**:
Tekstur kemur.

**Mentamálanevndin 03. oktober 2018:** Tikið av skrá.

**Ískoyti**:
Viðv. byggiøkinum sunnanfyri skýlið og parkeringsøkið vestanfyri

Umsitingin hevur samskift við P/F LBF, ið eisini stóð fyri projektering og eftirlitið í sambandi við arbeiðið í sjeytiárunum fyri at fáa meiri at vita um ætlaða byggiøkið. Felagið upplýsir, at mastrafundamentini við vestara skýlið eru funderað á hellu og at tá niðari vøllur varð dagførdur fyrst í 90 inum bleiv hella sprongd burtur í útnyrðingshorninum-niðan móti ovara

vølli. Felagið heldur harumframt, at tá skýlið og p-plássið vóru gjørd, at alt bleytt tilfar varð grivið burtur niður á fastan botn, fastan leir/ hellu og fylt uppaftur við gróti.

Við støði í hesum tykist vera greitt (við tí fyrivarni slíkar metingar um jarðfrøðilig viðurskifti altíð vilja hava!) at tað skuldi verið rímiliga líkatil at fara undir bygging har.

Viðv. sambyggingini av bygningunum
Sp/f MAP er ráðgevi hjá ÍSF og metir felagið at serligu kostnaðirnir fyri sambyggingina við ovara skýlið eru umleið 3.000 tkr., umframt útreiðslurnar til byggibúning sunnanfyri á 550 tkr.

Hjálagt eru dagførd skjøl t.e. skjeyti og ætlanarskriv um leiguavtalu.

Sbrt. avtaluni flytir ÍSF úr ognini í 2020. Neyva tíðspunktið verður ásett til at vera í seinasta lagi 1. juni 2020. Gjaldið fyri húsið verður at rinda í seinasta lagi við útflytning, meðan kostnaðurin fyri sambyggingina av nýggja ÍSF-húsinum, við skýlið við ovara vøll, fellir tá ÍSF fer undir byggingina. Hetta er enn óvist og helst gongur nakað av tíð, áðrenn tað verður farið undir tað. Í ætlanarskrivinum er ásett, at ÍSF skal vera farið undir bygging innan 2024.

**Tilmæli**:
Trivnaðarstjórin, leiðarin á stjórnarskrivstovuni og mentamálaleiðarin mæla mentamála-nevndini til at taka undir við at kommunan gerð avtalu við ÍSF um keyp av ÍSF-húsinum og ætlanarskriv um leiguavtalu. Málið verður beint í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Mentamálanevndin 28. november 2018:** Útsett.

**Ískoyti:**
ÍSF ynskir at skeytið verður treytað av at avtala er inngingin um leigusáttmála um bygning á leigari grund við skýlið við ovara vøll. Hetta gerð at ÍSF skal vera nakað fyrri við sínum fyrireikingum, men annars mett í lagi.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin, leiðarin á stjórnarskrivstovuni og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til at samtykkja at kommunan gerð avtalu við ÍSF um keyp av ÍSF-húsinum og ætlanarskriv um leiguavtalu. Málið verður beint í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Mentamálanevndin 10. desember 2018:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 13. desember 2018:** Samtykt at taka undir við Mentamálanevndini og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 13. desember 2018:** Einmælt samtykt.

**Fíggjarnevndin 10. apríl 2019:** Útsett.

**Ískoyti:**
Í næstum skal Tórshavnar kommuna, samsvarandi samtyktini í málinum, at skriva undir treytað skeytið um keyp av ÍSF-húsinum, við yvirtøku á sumri 2020. Mett verður hóskandi at játta fíggingini til keypið á 5.000 tkr., umframt tinglýsingargjald á 1% av keypsupphæddini, í inniverandi ári.

Samráðingar fara í næstum í gongd við ÍSF um endaligan leigusáttmála um lendið.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla til at játta 5.050 tkr. av tøkum peningini. Málið verður beint í býráðið til tvær viðgerðir.

**Fíggjarnevndin 24. apríl 2019:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið til tvær viðgerðir.

**Býráðsfundur 24. apríl 2019:** Fyrst varð atkvøtt um soljóðandi broytingaruppskot frá Annfinni Brekkstein: Mælt verður til at veita ÍSF stuðul við tí endamáli at taka húsið niður.

Broytingaruppskotið fall við 5 atkvøðum fyri, 7 ímóti og ongari blankari atkvøðu.

Fyri atkvøddu: Annfinn Brekkstein, Tróndur Sigurðsson, Bjørghild Djurhuus, Helena Dam á Neystabø og Bjørg Dam.

Imóti atkvøddu: Annika Olsen, Gunvør Balle, Marin Katrina Frýdal, Jákup Dam, Turid Horn, Bogi Andreasen og Bergun Kass.

Síðani varð atkvøtt um tilmælið frá fíggjarnevndini, ið varð samtykt við 11 atkvøðum fyri, ongari ímóti og einari blankari atkvøðu.

Fyri atkvøddu: Annika Olsen, Gunvør Balle, Marin Katrina Frýdal, Jákup Dam, Turid Horn, Bogi Andreasen Bergun Kass, Tróndur Sigurðsson, Helena Dam á Neystabø, Bjørghild Djurhuus og Bjørg Dam.

Blankt atkvøddi: Annfinn Brekkstein.

# 94/19 Umsókn um grundøkir til vardar bústaðir – Grundøki til bú- og umlættingarheim til børn og ung við autismu

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi- og býarskipanarnevndin | 13.03.2019 | 35/19 | 18/03266-1 |
| 2 Tekniska nevnd | 02.04.2019 | 21/19 | 18/03266-1 |
| 3 Fíggjarnevndin | 10.04.2019 | 108/19 | 18/03266-1 |
| 4 Býráðsfundur | 24.04.2019 | 94/19 | 18/03266-1 |

**Upprunin til málið:**
Almannaráðið hevur sent kommununi umbøn um grundøkir til vardar bústaðir í Tórshavn. Vísandi til bráðfeingis tørvin á nýggjum og tíðarhóskandi vardum bústøðum og bústovnum í Tórshavn, hevur landstýriskvinnan í almannamálum gjørt eina raðfestingarætlan fyri at loysa bráðfeingis tørvin á bústøðum fram til 2022. Tørvur er á fýra grundøkjum í Tórshavn til trý nýggj sambýli og eitt barnaheim, tískil er ynskiligt, at kommunan kann veita Almannaráðnum fýra grundøkir til endamálið í Tórshavn, íroknað
Argir og Hoyvík. Hesin fyrispurningurin varð viðgjørdur í mál nr. 17/00903 - Umsókn um grundøkir til vardar íbúðir, og er hetta málið framhald av fyrrverandi málið, har útvaldu staðsetingarnar vórðu samtyktar, og at umsitingin skuldi fara í samráðingar við Almannaráðið um endaligu staðsetingarnar, vídd av økjunum osfr. fyri at venda aftur í avvarðandi nevndir at viðgera hesi viðurskiftini.

**Lýsing av málinum - samandráttur**
Umsitingin umrøddi spurningin um økir til sambýlir og barnaheim í tráð við býarplanleggingina, og vísti í hesum sambandi á nøkur økir í ávikavist Tórshavn, Hoyvík og á Argjum. Har ímillum varð víst á eitt øki við Kvíggjartún á Argjum, matr. nr. 56a, har ynski er at staðseta eitt bú- og umlættingarheim til børn og ung við autismu.

Økið er partur av matr. nr. 56a, ogn hjá Tórshavnar kommunu, og strekkir økið seg eystur- og vestureftir við góðum útsýni yvir land, bý, hav og fjøll. Talan er um eitt grønt brattlendi, sum kann vera við til at skapa góð og mennandi uttandura øki til borgararnar í nýggja heiminum. Umhvørvið er opið og frítt, og seyður hoyrist skamt burturfrá - friður og tryggleiki valdar á staðnum, uttan at tað er avbyrgt.

Atkomuvegur er frá Traðagøtu, sum fer ígjøgnum matr. nr. 56cd, og niðan til økið, har heimið skal byggjast. Vegurin heldur fram inni á økinum, men verður í dag ikki nýttur, tí er lítil ferðsla á økinum. Niðanfyri eru góð parkeringsviðurskifti, men nýggj parkeringspláss verða somuleiðis partur av verkætlanini. Frá økinum ber til at ganga beint niðan á Glyvursvegin, umframt at gøtusamband er frá økinum og út á Hamaran. Gøtusambandið verður varðveitt og skal hugsast sum ein partur av sniðgevingini á økinum.

Eitt bú- og umlættingarheim til børn og ung við autismu, hóskar seg væl í økinum, m.a. tí tað liggur tætt við verkstaðið Vón, sum er ein partur av dagligdegnum hjá fleiri av búfólkunum.

Trý lógaruppskot vóru løgd fyri Tingið, sum fevna um bygging av nýggjum bú- og umlættingarheimi til børn og ung við autismu, barnaheimi og bygging av tveimum vardum bústøðum til fólk við menningartarni. Landsverk hevur tí latið evnað eitt skipanaruppskot til heim til børn og ung við autismu, sí uppskotið.

**Lógir, ásetingar o.a.**

Økið liggur í teimum trimum økispartunum A1, C3 og 4. grundumráði í almennu byggisamtyktini fyri Tórshavnar kommunu. Økispartarnir eru ætlaðir til ávikavist sethúsabygging (A1), miðstaðarendamál (C3), har loyvi er at byggja almennar stovnar og 4. grundumráði, sum í høvuðsheitum verður nýtt til landbúnað og alment frílendi.

Um nýtt bú- og umlættingarheim til børn og ung við autismu skal byggjast á økinum, má økið broytast til C3 øki í 3. grundumráði í almennu byggisamtyktini, har ásetingarnar eru:

1. *Umráðisparturin verður í síni heild lagdur til miðstaendamál, t.e. handlar, skrivstovuhøli, ráðleggingarvirki og tænastuvirki ið hava samband við hetta. Loyvt er eisini at byggja skúlar, almennar stovnar og íbúðir.*

2. *Útstykking og bygging verður einans loyvd sambært serstakari byggisamtykt, ið byggivaldið hevur.*

3. *Byggistigið fyri umráðispartin má ikki fara upp um 0,4.*

4. *Nýtslustigið fyri umráðispartin má ikki fara upp um 0,8.*

Mál nr. 19/00747 viðgerð málið um broyting av almennu byggisamtyktini.

Í sambandi við nýggjar útstykkingar í C3 øki skal nýggj serstøk byggisamtykt gerast. Her verður víst til mál nr. 19/00769.

**Upplýsingar frá umsitingini**
Tørvur er á einum øki áleið 7600 m$^2$, og skal eitt nýtt heim byggjast á økinum, má eitt hóskandi øki sundurbýtast frá matr. nr. 56a, sí uppskot til sundurbýti á *kortskjali_keyp av lendi*, journal nr. 18/03266-9.

Ástaðarfundur var hin 16. februar 2018, har kommunan saman við umboðum frá ymsu áhugabólkunum vísti á ymsu økini og møguleikarnar. Býarverkfrøðingurin var við á staðnum, og viðmerkti at infrakervið var gott, vegur er longu niðan á økið og økið er tætt við almenna ferðslu.

Landsverk eru kunnaði um, at atkomuvegurin er ígjøgnum matr. nr. 56cd, ogn hjá Føroya landsstýri, og skulu tey kanna og avgreiða viðurskiftini, soleiðis at atkoman til økið, har nýtt heim skal byggjast, verður framtíðartryggjað.

Serstøk byggisamtykt skal gerast fyri økið, sí journal nr. 19/00769 og í henni verður tryggjað, at gøtusambandið frá Hamrinum til Kvíggjartún verður varðveitt.

Í viðgerðini av serstøku byggisamtyktini fyri økið, verður atkoman til matr. nr. 32e, sum er ígjøgnum matr. nr. 56a, somuleiðis umrødd.

Sí annars viðheftu skeytir o.a. fyri matr. nr. 56cd og matr. nr. 56a.

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**
17/00903 – Umsókn um grundøkir til vardar íbúðir.
19/00747 – Broyting av almennu byggisamtyktini fyri økið við Kvíggjartún, matr. nr. 56a, Argir til C3 øki.
19/00769 – Nýggj serstøk byggisamtykt fyri heim til børn og ung við autismu við Kvíggjartún, matr. nr. 56a, Argir.

**Møgulig frávik/lættar frá ásetingum**

**Umhvørvisárin**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl**
*HHA_Skipanaruppskot_16.11.18*, journal nr. 18/03266-4
*Skeyti o.a. fyri matr. nr. 56a*, journal nr. 18/03266-7
*Skeyti o.a. fyri matr. nr. 56cd,* journal nr. 18/03266-8
*Kortskjal_keyp av lendi*, journal nr. 18/03266-9

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum (set x)**

| | **Fyri Tórshavnar kommunu** | **Fyri ávís øki í kommununi** | **Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir** | **Fyri vinnuna** |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar: Ja ☐ Nei ☐**

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til at samtykkja endaligu staðsetingina av sambýlinum sambært kortskjali_keyp av lendi, journal nr. 18/03266-9, at sundurbýta og selja Almannaráðnum eitt øki áleið 7600 $m^2$ frá matr. nr. 56a sambært sama kortskjali, at gera uppskot til broyting av almennu byggisamtyktini, at gera nýggja serstaka byggisamtykt og at beina málið í teknisku nevnd til kunningar og býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 13. mars 2019:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Tekniska nevnd 02. apríl 2019:** Kunnað varð um málið.

**Fíggjarnevndin 10. apríl 2019:** Samtykt at taka undir við byggi- og býarskipanarnevndini og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 24. apríl 2019:** Einmælt samtykt.

## 95/19 Heimsmálini hjá ST - Global Agenda 2030

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Náttúru- og umhvørvisnevndin | 11.02.2019 | 10/19 | 19/00172-1 |
| 2 Vinnunevndin | 11.03.2019 | 16/19 | 19/00172-1 |
| 3 Tekniska nevnd | 12.03.2019 | 10/19 | 19/00172-1 |
| 4 Mentamálanevndin | 13.03.2019 | 99/19 | 19/00172-1 |
| 5 Byggi- og býarskipanarnevndin | 13.03.2019 | 41/19 | 19/00172-1 |
| 6 Trivnaðarnevndin | 14.03.2019 | 9/19 | 19/00172-1 |
| 7 Eldranevndin | 19.03.2019 | 3/19 | 19/00172-1 |
| 8 Fíggjarnevndin | 20.03.2019 | 81/19 | 19/00172-1 |
| 9 Býráðsfundur | 28.03.2019 | 70/19 | 19/00172-1 |
| 10 Býráðsfundur | 24.04.2019 | 95/19 | 19/00172-1 |

**Upprunin til málið:**
Sameindu Tjóðir (ST) vísa á 17 mál, ið fyri ár 2030 kunnu skapa ein betri heim. Altjóða átakið, sum byrjaði í 2015, verður kallað Heimsmál fyri burðardyggari menning - “The 2030 Agenda for Sustainable Development” ella “Global Agenda 2030”.

**Lýsing av málinum – samandráttur**
Heimsmálini eru 17 í tali, ið hava til endamáls, at allar heimsins tjóðir stremba ímóti einum burðardyggum samfelagi og burðardyggum heimi, t.v.s. at øll lond mennast búskaparliga, sosialt og umhvørvisliga á ein burðardyggan hátt. Hugsjónin er, at øll heimsins lond skulu arbeiða við at røkka hesum 17 málum í 2030.

Føroya Landsstýri hevur eisini sett Heimsmálini hjá ST á skrá í Føroyum, og eru heimsmálini týdd til føroyskt. Til tey 17 yvirskipaðu heimsmálini eru 169 undirmál. Sí viðløgdu føroysku týðingina av heimsmálunum.

Nógvar kommunur í norðurlendskum høpi hava longu tikið heimsmálini til sín og hava implementera hesi á kommunalum støði, og enn fleiri kommunur eru í ferð við at seta Heimsmálini hjá ST á skrá.

Ikki øll heimsmál eru eins viðkomandi fyri Tórshavnar kommunu. Nøkur av teimum heimsmálum, sum eru viðkomandi, eru eitt nú burðardygg orka, góð heilsa og vælferð, burðardyggir býir og bygdir v.fl. Meðan onnur heimsmál eru meiri viðkomandi fyri lond, sum stríðast við fátækradømi, javnstøðurættindum o.ø.

Ymiskt er, hvussu kommunur arbeiða við heimsmálunum. Sum dømi kann nevnast, at Gladsaxe kommuna hevur íverksett heimsmálini í sonevnda ‘Gladsaxestrategien’ og arbeiðir miðvíst við heimsmálunum í samstarvi við m.a. stovnar og fyritøkur í kommununi. Í Gladsaxe kommunu hava tey í fyrstu atløgu valt at seta fokus á 7 av heimsmálunum. Sigast kann, at Gladsaxe kommuna er ein av førandi kommununum í Danmark at arbeiða við heimsmálunum. Sí viðlagda skjal um ‘Gladsaxestrategien’.

Umhvørvispolitikkurin ‘Grøna Leiðin’ hjá Tórshavanr kommunu samsvarar væl við fleiri av heimsmálunum hjá ST, og tískil hevur umhvørvisdeildin í ein vissan mun arbeitt við heimsmálunum. Millum annað luttók starvsfólk á umhvørvisdeildini á ráðstevnu um heimsmálini í Helsinki í november 2016. Ráðstevnan snúði seg í høvuðsheitum um hvussu kommunur í norðurlondum kunnu samstarva viðvíkjandi Heimsmálunum hjá ST.

Í 2017 vóru somuleiðis forkvinnan í náttúru- og umhvørvisnevndini, leiðarin og starvsfólk á umhvørvisdeildini á vitjan á Afdelingen for Bæredygtig Udvikling í Københavns kommunu, har tey góvu innlit í, hvussu tey arbeiða við ymiskum umhvørvisverkætlanum við støði í heimsmálunum. Tilgongdin hjá teimum var serliga at fremja verkætlanir á skúlum og dagstovnum fyri at læra og eggja børnum til ein burðardyggan lívshátt.

Við verkætlanum og átøkum innan 'Grønu Leiðina' er Tórshavnar kommuna við í norðurlendskari frágreiðing (Global goals for local priorities: The 2030 Agenda at local level), sum lýsir hvussu nakrar norðurlendskar kommunur arbeiða við heimsmálum hjá ST. Les um umhvørvispolitikkin hjá Tórshavnar kommunu á s. 38 sí viðløgdu frágreiðing.

Umhvørvisdeildin arbeiðir við at samantvinna Grønu Leiðina og heimsmálini hjá ST og at gera ein felags leist fyri umhvørvispolitikkin og heimsmálini og á henda hátt sjónliggera, at Tórshavnar kommuna arbeiðir miðvíst við heimsmálunum á umhvørvisøkinum.

Umhvørvisdeildin metir eisini, at tað hevði verið skilagott, at Tórshavnar kommuna í síni heild setir Heimsmálini hjá ST á dagsskrá, og at aðrar deildir og stovnar somuleiðis arbeiða við heimsmálunum. Fyri at íverkseta heimsmálini í Tórshavnar kommunu er í fyrstu atløgu neyðugt at eyðmerkja, hvørji heimsmál eru av týdningi fyri Tórshavnar kommunu, t.d. við at seta ein arbeiðsbólk við umboðum frá ymiskum deildum/stovnum.

**Umhvørvisárin**
Samfelagslig burðardygg menning er til gagn fyri menniskju, náttúru og umhvørvi.

**Skjøl:**
- Heimsmálini á FO (januar 2019)
- Gladsaxestrategien 2018-2022
- Global goals for local priorities: The 2030 Agenda at local level, Nordregio report 2018:2

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum (set x)**

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | X | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | X | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar: Ja ☐ Nei ☐**

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og leiðarin á umhvørvisdeildini mæla til, at náttúru- og umhvørvisnevndin tekur undir við, at Heimsmálini hjá ST verða partur av Grønu leiðini og at seta heimsmálini hjá ST á dagsskrá í Tórshavnar kommunu og at beina málið í politisku nevndirnar og í býráðið til samtyktar.

Mælt verður til at seta ein arbeiðsbólk við umboðum frá ymiskum deildum í umsitingini, og at býráðið velur ein tilhoyrandi stýrisbólk við tí endamáli at íverkseta Heimsmálini hjá ST í Tórshavnar kommunu.

**Náttúru- og umhvørvisnevndin 11. februar 2019:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Vinnunevndin 11. mars 2019:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Tekniska nevnd 12. mars 2019:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Mentamálanevndin 13. mars 2019:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 13. mars 2019:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Trivnaðarnevndin 14. mars 2019:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Eldranevndin 19. mars 2019:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 20. mars 2019:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 28. mars 2019:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Býráðið verður biðið um við lutfalsvali at velja limir í stýrisbólkin, við tí endamáli at íverkseta Heimsmálini hjá ST í Tórshavnar kommunu**.**

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og leiðarin á umhvørvisdeildini mæla býráðnum til at tilnevna tveir býráðspolitikarar sambært § 36 í kommunustýrislógini at sita í stýrisbólkinum.

**Býráðsfundur 24. apríl 2019:** Valdar vórðu: Turið Horn og Bjørghild Djurhuus.

# 96/19 Nýggj serstøk byggisamtykt fyri heim til børn og ung við autismu við Kvíggjartún, matr. nr. 56a, Argir

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi- og býarskipanarnevndin | 27.03.2019 | 56/19 | 19/00769-1 |
| 2 Býráðsfundur | 24.04.2019 | 96/19 | 19/00769-1 |

**Upprunin til málið:**
Í sambandi við at Almannaráðið hevur heitt á Tórshavnar kommunu um at vísa á lendi til ymiskar almennar stovnar, er samtykt at selja Almannaráðnum part av matr. nr. 56a, uml. 7600 $m^2$, við Kvíggjartún á Argjum, og hevur Almannaráðið ætlanir um at byggja heim til børn og ung við autismu á økinum. Skjal *Kort 1.*

**Lýsing av málinum – samandráttur**
Matr. nr. 56a, Argir liggur í trimum ymiskum byggisamtyktarøkjum – C3, A1 og 4. Grundumráði. Byggi- og býarskipanarnevndin samtykti á fundi 13. mars 2019 uppskot um at broyta almennu byggisamtyktina soleiðis, at økið liggur í C3 øki, ætlað miðstaendamálum, harímillum almennum stovnum, sí mál *Broyting av almennu byggisamtyktini fyri økið við Kvíggjartún, matr. nr. 56a, Argir til C3 øki*. Øll bygging í C3 øki skal gerast sambært serstakari byggisamtykt.

Sambært skipanaruppskotinum er heimið skipað í tríggjar eindir við einum opnum garði í miðjuni – ein búeind, ein umlættingareind og ein virkiseind. Bú- og umlættingareindin hava 6 íbúðir hvør. Samlaða víddin á tí bygda er uml. 1200 $m^2$, sí skjal *HHA_ Skipanaruppskot.*

Í málinum *Umsókn um grundøkir til vardar bústaðir – grundøki til bú- og umlættingarheim til børn og ung við autismu* verður sagt:

*"... og strekkir økið seg eystur- og vestureftir við góðum útsýni yvir land, bý, hav og fjøll. Talan er um eitt grønt brattlendi, sum kann vera við til at skapa góð og mennandi uttandura øki til borgararnar í nýggja heiminum. Umhvørvið er opið og frítt, og seyður hoyrist skamt burturfrá – friður og tryggleiki valdar á staðnum, uttan at tað er avbyrgt."*

Somuleiðis verður sagt:

*"Eitt bú- og ummlættingarheim til børn og ung við autismu, hóskar seg væl í økinum, m.a. tí tað liggur tætt við verkstaðið Vón, sum er ein partur av dagligdegnum hjá fleiri av búfólkunum."*

Atkoman til økið er gjøgnum matr. nr. 56cd og 20 p-pláss eru á økinum. Gøtusambandið, sum er frá Hamarinum, gjøgnum økið og niðan á Glyvursvegin er varðveitt í skipanaruppskotinum, sí skjal *Kort 2*. Somuleiðis er atkoman til matr. nr. 32e, sum er ígjøgnum matr. nr. 56a, tryggja í skipanaruppskotinum.

Mett verður ikki, at viðurskifti viðvíkjandi ljósi og útsýninum hjá grannunum verður broytt munandi, av tí at lendið er bratt og bygt verður fyri tað mesta í einari hædd, tó summastaðni í tveimum hæddum, sí skjal *HHA_skipanaruppskot_Lendisskurður_1-150.*.

**Lógir, ásetingar o.a.**

Um uppskotið um broyting av almennu byggisamtyktini fyri Tórshavnar kommunu verður góðkent, liggur økið í C3 øki. Ásetingarnar fyri C3 øki eru:

*§22. Stk. 1. Umráðisparturin verður í síni heild lagdur til miðstaendamál, t.e. handlar, skrivstovuhøli, ráðleggingarvirki og tænastuvirki, ið hava samband við hetta. Loyvt er eisini at byggja skúlar, almennar stovnar og íbúðir.*

*Stk. 2. Útstykking og bygging verður einans loyvd sambært serstakari byggisamtykt, ið byggivaldið hevur góðkent fyri alt økið ella ein natúrliga avmarkaðan part av tí,*

*Stk. 3. Byggistigið fyri umráðispartin má ikki fara upp um 0,4.*

*Stk. 4. Nýtslustigið fyri umráðispartin má ikki fara upp um 0,8.*

**Upplýsingar frá umsitingini**
Vegatkoman til matr. nr. 56a, sum er økið, ið serstaka byggisamtyktin umfatar, er ígjøgnum matr. nr. 56cd, sum er ogn hjá Føroya landsstýri. Hesin vegrættur er ikki tinglýstur á ognini, men avtala er gjørd við eigaran av matr. nr. 56cd, um at loyva almennari ferðslu gjøgnum ognina, sí skjal *Avtala.* Hendan avtalan kann uppsigast av eigaranum við 2 ára freist.

Sethúsini á matr. nr. 32e hava vegatkomu gjøgnum matr. nr. 56a. Hesin vegrættur er ei heldur tinglýstur, men hevur verið nýttur sum atkoma til ognina síðani húsini vórðu bygd. Sambært skipanaruppskotinum, so varðveitir matr. nr. 32e vegatkomuna gjøgnum matr. nr. 56a.

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**
*Umsókn um grundøkir til vardar bústaðir – Grundøki til bú- og umlættingarheim til børn og ung við autismu,* journal nr. 18/03266.
*Broyting av almennu byggisamtyktini fyri økið við Kvíggjartún,* matr. nr. 56a, Argir til C3 øki.

**Møgulig frávik/lættar frá ásetingum**

**Umhvørvisárin**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl**
*Avtala*, journal nr. 19/00769-3.
*Serstøk byggisamtykt – tekstur,* journal nr. 19/00769-7.
*HHA_skipanaruppskot_Lendisskurður_1-150,* journal nr. 19/00769-6.
*Støðumynd, journal nr. 19/00769-6.*
*HHA_Skipanaruppskot_16.11,* journal nr. 19/00769-5.
*Kort 1, journal nr. 19/00769-6.*
*Kort 2,* journal nr. 19/00769-6.

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum (set x)**

| | **Fyri Tórshavnar kommunu** | **Fyri ávís økir í kommununi** | **Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir** | **Fyri vinnuna** |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar: Ja ☐ Nei ☐**

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til at samtykkja uppskotið um nýggja serstaka byggisamtykt fyri almennan stovn við Kvíggjartún, matr. nr. 56a, Argir og beina málið í býráðið.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 27. mars 2019:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Býráðsfundur 24. apríl 2019:** Einmælt samtykt.

# 97/19 Nýggj serstøk byggisamtykt á Argjaboða, matr. nr. 43g, Argir

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi- og býarskipanarnevndin | 27.03.2019 | 57/19 | 18/03069-1 |
| 2 Býráðsfundur | 24.04.2019 | 97/19 | 18/03069-1 |

**Upprunin til málið:**
Byggi- og býarskipanarnevndin samtykti á fundi 11. apríl 2018 at taka undir við, at íbúðir verða bygdar á matr. nr. 43g, Argir, og at serstøk byggisamtykt verður gjørd fyri økið.

**Lýsing av málinum – samandráttur**
Tórshavnar kommuna hevur fingið umsókn um at byggja íbúðarhús við 27 íbúðum umframt felagshús á matr. nr. 43g, á Argjaboða, sí skjal *Støðumynd*. Økið liggur í C3 øki í almennu byggisamtyktini fyri Tórshavnar kommunu, og sambært ásetingunum í økinum kann bygging einans verða loyvd sambært serstakari byggisamtykt.

Um verkætlanina sigur umsøkjarin m.a.:
- *“Grundstykkið er bratt, við einum meðalhalli á 26%. (Í meðal 12 hæddarmetrar í mun til breiddina á grundstykkinum) Hetta merkir, at um byggjast skal á skilagóðan hátt er neyðugt við alternativum loysnum til eitt nú parkering”*
- *“... Sp/f West-trading arbeitt við eini byggiætlan, har lendið verður minst møguligt ávirkað, og at allir fasilitetir, ið neyðugir eru fyri, at fólk skal trívast og støðast í slíkum íbúðarøki, eru til staðar. M.a. er ætlanin, at eitt felagshús til samkomur og aðrar aktivitetir, er partur av byggiætlanini”.*

Talan er um 27 íbúðir, sum eru 93 $m^2$ hvør og hava trý kømur. Allar íbúðirnar hava egna terassu, vásarúm, úthús og privat p-pláss í parkeringskjallara. Harumframt er eitt felagsrúm, sum er 200 $m^2$ og felags terassur, sí skjøl *Flatmynd* og *Parkering*. Umsitingin metir, at talan er um eitt íbúðarsnið, sum ikki so nógv er av frammanundan, tá hugsað verður um talið av kømrum og hentleikarnir, bæði privatar og felags, sum annars eru partar av verkætlanini.

Íbúðarbygningurin er uml. 14 m høgur og er í 4 hæddum – ein parkeringskjallari og 3 hæddir við íbúðum. Stórur hæddarmunur er í økinum og uml. 20 metur eru til nærmasta granna móti sunnan, so mett verður at hettar er hóskandi í økinum.

**Lógir, ásetingar o.a.**
Økið liggur í C3 øki í almennu byggisamtyktini fyri Tórshavnar kommunu.

Økisásetingarnar eru:
*§ 22. Ásetingar fyri umráðispartin C3 í 3. Grundumráði*
1. *Umráðisparturin verður í síni heild lagdur til miðstaendamál, t.e. handlar, skrivstovuhøli, ráðleggingarvirki og tænastuvirki, ið hava samband við hetta. Loyvt er eisini at byggja skúlar, almennar stovnar og íbúðir.*
2. *Útstykking og bygging verður einans loyvd sambært serstakari byggisamtykt, ið byggivaldið hevur góðkent fyri alt økið ella ein nattúrliga avmarkaðan part av tí.*
3. *Byggistigið fyri umráðispartin má ikki fara upp um 0,4.*
4. *Nýtslustigið fyri umráðispartin má ikki fara upp um 0,8.*

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**
*Umsókn um byggiloyvi til íbúðarhús við 27 íbúðum á matr. nr. 43g, Argir* – journal nr. 18/00909.

**Møgulig frávik/lættar frá ásetingum**
Ongar ásetingar eru um mest loyvdu hædd fyri bygging í C3 øki í almennu byggisamtyktini fyri Tórshavnar kommunu. Tó, so er vanligt at nýta ásetingina í BK17 fyri hæddarviðurskifti í mun til frástøðu frá marki, 2.2.3.2 sum sigur, at hæddin á útveggi móti grannamarki í mesta lagi má vera 2,4 x fráleikan til grannamark og gøtu.

Hendan ásetingin inniber, at bygningurin, sum er 13,8 m høgur, skal standa minst 5,75 m frá marki. Móti suðuri stendur bygningurin uml. 2,5 m frá marki. Umsøkjarin søkir tí um at keypa uml. 78 m$^2$ frá kommunu at leggja afturat ogn síni suðureftir, sí skjal *Støðumynd,* soleiðis at kravið um fráleika kann verða hildið, og er góðkenning av uppskotinum til nýggja serstaka byggisamtykt treytað av, at umsøkjarin fær loyvi til tess.

Parkeringskjallarin er ikki taldur við í nýtslustigið, sum er uml. 0,79. Mett verður at hetta er ráðiligt, av tí at grundstykkið er bratt, og um nøktandi parkeringsviðurskifti skuldi fingist til byggingina, hevði inntrivið í umhvørvið verið munandi størri. Somuleiðis eru onnur dømir um, at kjallarahædd ikki verður tald við í nýtslustignum, t.d. serstaka byggisamtyktin fyri Dr. Jakobsens gøtu og Sverrisgøtu.

**Umhvørvisárin**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**
Í máli 18/00909 – *Umsókn um byggiloyvi til íbúðarhús við 27 íbúðum á matr. nr. 43g, Argir* hevur tekniska deild hesa viðmerkingina:

*Vatnleiðing liggur í vegnum og er hon nøktandi í mun til fyriliggjandi verkætlan.*

*Verandi kloakkleiðing í økinum, klárar ikki at taka ímóti spillvatni frá27 íbúðum og má ein loysn finnast á hesum. Tað eru í høvuðsheitum tvinnar loysnir:*

1. *Nýggj útleiðing út á streymasjógv.*
2. *Pumpuskipan, sum megnar at pumpa spillvatnið upp í leiðingina, sum kemur frá útstykkingini undir Kongavarða og liggur nakað omanfyri matr. nr. 43g.*

*Talan er um lutfalsliga kostnaðarmiklar loysnir og tað fyriliggja ikki neyv tøl júst nú.*

**Skjøl**
*Serstøk byggisamtykt – tekstur,* journal nr. 18/03069-4.
*Framsíða suður*, journal nr. 18/03069-9.
*Parkering*, journal nr. 18/03069-9.
*Støðumynd*, journal nr. 18/03069-9.
*Yvirlitskort*, journal nr. 18/03069-9.
*Flatmynd*, journal nr. 18/03069-9.
*Framsíða eystur*, journal nr. 18/03069-9.

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum (set x)**

| | **Fyri Tórshavnar kommunu** | **Fyri ávís økir í kommununi** | **Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir** | **Fyri vinnuna** |
|---|---|---|---|---|

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** **Ja ☐** **Nei ☐**

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til at góðkenna uppskotið til nýggja serstaka byggisamtykt fyri matr. nr. 43g, Argir, treytað av at umsøkjarin fær loyvi at keypa lendið, og beina málið í býráðið.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 27. mars 2019:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Býráðsfundur 24. apríl 2019:** Einmælt samtykt.

# 98/19 Framflytingar fyri árið 2018

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 24.04.2019 | 120/19 | 19/01527-1 |
| 2 Býráðsfundur | 24.04.2019 | 98/19 | 19/01527-1 |

**Upprunin til málið:**
Mannagongdin hjá Tórshavnar Kommunu er, at ikki nýttar játtanir verða fluttar til komandi ár. Hesar skulu játtast í Býráðnum sum eykajáttan.

**Lýsing av málinum – samandráttur**
Í sambandi við, at roknskapurin fyri 2018 er gjørdur upp, er gjørt eitt yvirlit yvir rakstrar- og íløgujáttanir at flyta fram til 2019.

Samlaða framflytingin, íroknað Tórshavnar Havn, fyri rakstur er 23,7 mió.kr netto og fyri íløgur 223,2 mió.kr.

Stjórnin mælir til fylgjandi broytingar í framflytingum:

| | **Fíggjast av:** | | | **Flyast á:** | |
|---|---|---|---|---|---|
| **Deild** | **Navn** | **Upphædd** | **Deild** | **Navn** | **Upphædd** |
| **§2** | | | | | |
| 2720 | Heilsuhúsið | **481** | 2721 | Røktartænastur | **4.218** |
| 2722 | Tilboð | **4.904** | 2730 | Fyrisiting | **44** |
| 2731 | Gjøld fyri røktartænastur | **807** | 2755 | Flytingar millum samstørv | **2.990** |
| 2750 | Ansingarsamsýning | **1.017** | | | |
| 2761 | Leiga | **43** | | | |
| **§3** | | | | | |
| 3142 | Frítíðarskúlin á Argjahamir | **153** | 3317 | Ungdómshús á Argjum | **153** |
| **§4** | | | | | |
| 4125 | Frískúlin í Lítlaskúla | **101** | 4126 | Forskúlin til Lítlsakúla | **101** |
| **§6** | | | | | |
| 6211 | Aðrar útreiðslur fríðkan | **389** | 6210 | Fríðkan og viðlíkahald | **389** |
| 6610 | Umhvørvistiltøk | **129** | 6611 | Aðrar útreiðslur umhvørvistiltøk | **129** |
| 6610 | Umhvørvistiltøk | **713** | 6710 | Vatnveiting | **713** |
| 6610 | Umhvørvistiltøk | **383** | 8210 | Gøtuljós | **383** |
| 6610 | Umhvørvistiltøk | **307** | 7610 | Parkeringsskipan | **307** |
| 8112 | Asfalt | **682** | 8113 | Ferðsla | **682** |
| 8112 | Asfalt | **312** | 6210 | Fríðkan og viðlíkahald | **312** |
| **§7** | | | | | |
| 7110 | Renovatión | **755** | 1313 | Tekniska fyrisiting | **755** |

| | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|
| 7110 | Renovatión | **3.500** | 8375 | Rakstrargøgn | **3.500** |
| 7510 | Bussleiðin | **307** | 7610 | Parkeringsskipan | **307** |
| 7510 | Bussleiðin | **154** | 6210 | Fríðkan og viðlíkahald | **154** |
| 8112 | Bussleiðin | **385** | 6110 | Umsiting og røkt bygningar | **385** |
| 8112 | Bussleiðin | **172** | 6510 | Kirkjugarðar | **172** |
| 8112 | Asfalt | **312** | 6210 | Fríðkan og viðlíkahald | **312** |
| | **Tilsamans** | **16.006** | | **Tilsamans** | **16.006** |

Fyri Tórshavnar Havn mælir Havnameistarin til at flyta fram minus 761 tkr netto til rakstur og 84,8 mió. kr til íløgur.

Inntøkurnar hjá Tórshavnar Havn fyri 2018 eru umleið 10 mió.kr hægri enn mett.

Havnameistarin mælir tí eisini til fylgjandi flytingar av meirinntøku:

| | **Fíggjast av:** | | | **Flyast á:** | |
|---|---|---|---|---|---|
| **Deild** | **Navn** | **Upphædd** | **Deild** | **Navn** | **Upphædd** |
| **§7 7410** | **Tórshavnar havn** | | **§7 7410** | **Tórshavnar havn** | |
| 21 | Søla av vørum og tænastum | **4.500** | 14 | Keyp av vørum og tænastum | **1.500** |
| | | | 16 | Leiga og viðlíkahald | **3.000** |
| | **Tilsamans** | **4.500** | | **Tilsamans** | **4.500** |

**Lógir, ásetingar o.a.**

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál, sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Møgulig frávik/léttar frá ásetingum**

**Umhvørvisárin**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl**

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum (set x)**

| | **Fyri Tórshavnar kommunu** | **Fyri ávís økir í kommununi** | **Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir** | **Fyri vinnuna** |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

| | | |
|---|---|---|
| | **Býráðsfundur**<br>24. apríl 2019 | Blað nr.: 406<br><br>Formansins merki: |

**Fíggjarligar avleiðingar:** **Ja ☐** **Nei ☐**

**Tilmæli:**
Kommunustjórin, fyrisitingarstjórin og fíggjarleiðarin mæla til at játta samlaða framflyting fyri rakstur 23,7 mió.kr netto og fyri íløgur 223,2 mió.kr. umframt verður mælt til at samtykkja omanfyri nevndu broytingar og beina málið í býráðið.

**Fíggjarnevndin 24. apríl 2019:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 24. apríl 2019:** Einmælt samtykt.

# 99/19 Ársroknskapur fyri Tórshavnar kommunu 2018

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 24.04.2019 | 121/19 | 19/01526-1 |
| 2 Býráðsfundur | 24.04.2019 | 99/19 | 19/01526-1 |

**Upprunin til málið:**
Sambært kommunustýrislógini hevur fíggjarnevndin ábyrgd av at leggja grannskoðaðan roknskap, saman við grannskoðanarfrágreiðingini, fyri kommunustýrið til góðkenningar og undirskrivingar.

**Lýsing av málinum – samandráttur**

**Lógir, ásetingar o.a.**

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Møgulig frávik/lættar frá ásetingum**

**Umhvørvisárin**
**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl:**
Grannskoðanarprotokoll
Ársroknskapur 2018

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** (set x)

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| Umsitingaravleiðingar | | | | |
| Umhvørvisavleiðingar | | | | |
| Sosialar avleiðingar | | | | |
| Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar: Ja ☐ Nei ☐**

**Tilmæli:**
Kommunustjórin, fyrisitingarstjórin og fíggjarleiðarin mæla býráðnum til umvegis fíggjarnevndina at góðkenna ársroknskapin fyri 2018.

**Fíggjarnevndin 24. apríl 2019:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 24. apríl 2019:** Einmælt samtykt.

| | | |
|---|---|---|
| | **Býráðsfundur**<br>24. apríl 2019 | Blað nr.: 409<br>Formansins merki: |

## 100/19 Góðkenning av mánaðarroknskapinum 2019

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 25.02.2019 | 52/19 | 19/00096-1 |
| 2 Býráðsfundur | 28.02.2019 | 48/19 | 19/00096-1 |
| 3 Fíggjarnevndin | 20.03.2019 | 86/19 | 19/00096-1 |
| 4 Býráðsfundur | 28.03.2019 | 73/19 | 19/00096-1 |
| 5 Fíggjarnevndin | 24.04.2019 | 122/19 | 19/00096-1 |
| 6 Býráðsfundur | 24.04.2019 | 100/19 | 19/00096-1 |

**Upprunin til málið:**
Sambært kunngerð nr. 89 frá 15. oktober 2008 um roknskaparverk kommununnar o.t. §10 skulu kommunur innraportera roknskapardátur hvønn mánað til Fíggjarmálaráðið.

Sambært § 9 skal kommunustýrið góðkenna.

**Lýsing av málinum – samandráttur**

**Lógir, ásetingar o.a.**

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Møgulig frávik/léttar frá ásetingum**

**Umhvørvisárin**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl**

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** (set x)

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| Umsitingaravleiðingar | | | | |
| Umhvørvisavleiðingar | | | | |
| Sosialar avleiðingar | | | | |
| Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar | | | | |

| **Býráðsfundur**<br>24. apríl 2019 | Blað nr.: 410<br>Formansins merki: |
|---|---|

**Fíggjarligar avleiðingar:** **Ja ☐ Nei ☐**

**Ískoyti:**
Roknskapurin fyri januar verður lagdur fram á fundinum.

**Fíggjarnevndin 25. februar 2019:** Framlagt.

**Býráðsfundur 28. februar 2019:** Framlagt.

**Ískoyti:**
Roknskapurin fyri februar verður lagdur fram á fundinum.

**Fíggjarnevndin 20. mars 2019:** Framlagt.

**Býráðsfundur 28. mars 2019:** Framlagt.

**Ískoyti:**
Roknskapurin fyri mars verður lagdur fram á fundinum.

**Fíggjarnevndin 24. apríl 2019:** Framlagt.

**Býráðsfundur 24. apríl 2019:** Framlagt og góðkent.

**FUNDURIN LOKIN KL. 20:15**

**GERÐABÓKIN GÓÐKEND:**

| | | |
|---|---|---|
| Annika Jacobina Olsen | Helena á Dam Neystabø | Tróndur Sigurðsson |
| Halla Samuelsen | Bogi Andreasen | Annfinn Brekkstein |
| Jákup Dam | Marin Katrina Ragnarsdóttir Frýdal | Bjørghild Djurhuus |
| Gunvør Balle | Turið Horn | Bergun Kass |
| | Bjørg Dam | |